# Á l i t

# í

## løgtingsmáli nr. 19/2008: Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2009

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 30. september 2006, og eftir 1. viðgerð, sum var 8. oktober 2006, varð málið beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á 19 fundum.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við

Kaj Leo Johannesen, løgmann
Jørgen Niclasen, landsstýrismann í uttanríkismálum
Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum
Hans Paula Strøm, landsstýrismann í heilsumálum
Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum
Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum
Johan Dahl, landsstýrismann í vinnumálum
Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum
Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum

Eisini hevur Fíggjarnevndin havt fund við búskaparstovnar, peningastovnar, tryggingarfeløg, umboð fyri fiskivinnuna og fakfeløg.

Fíggjarlógaruppskotið er merkt av, at nýggja landsstýrið ikki hevur fingið tíð til at gera eitt fullfíggjað uppskot. Somuleiðis er uppskotið ikki lagað til nýggja málsøkjabýtið.

Búskaparliga afturgongdin í heimsbúskapinum hevur eisini rakt Føroyar og harvið eisini landskassan. Inntøkurnar eru minkaðar í stórum seinastu mánaðirnar, og tekin eru um, at gongdin ikki verður stórt frægari komandi árið. Tí hevur verið neyðugt at fremja tillagingar av fíggjarlógini fyri at minka um útreiðsluvøksturin og samstundis at skapa virksemi kring landið.

Manglandi gjaldførið er ein stórur trupulleiki, og Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrið eigur í størri mun at fíggja undirskot landskassans við lántøku uttanlands. Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrið sum skjótast eigur at koma í Løgtingið við uppskoti um at útvega landsstýrinum heimild til at fíggja hallið á Løgtingsins fíggjarlóg í 2009. Eisini eigur landsstýrið at skipa fyri, at útflutningsvinnan fær betri møguleikar fyri útflutningstrygd (eksportkreditt).

Fíggjarlógaruppskotið, sum var lagt fyri Løgtingið, hevði eitt hall á 244 mió. kr., og meðan uppskotið hevur verið til viðgerðar í Fíggjarnevndini, er landsstýrið komið við umbønum um at økja útreiðslurnar við 44 mió. kr. og við nýggjari inntøkumeting, sum minkar um inntøkusíðuna við 282 mió. kr. Hetta merkir, at samlaða uppskotið frá landsstýrinum, sum hevur verið til viðgerðar í Fíggjarnevndini, hevur í útgangsstøðinum havt eitt hall á 571 mió. kr.

Tá Fíggjarnevndin ikki kann fremja lógarbroytingar, men má fyrihalda seg til galdandi lóggávu, hevur nevndin havt avmarkaðar møguleikar fyri at tillaga fíggjarlógina til broyttu búskaparligu fyritreytirnar. Hóast hetta hevur tað eydnast nevndini at minka um hallið við 57 mió. kr., soleiðis at hallið nú er 503 mió. kr. íroknað løgur á YYY mió. kr. Harumframt eru trý broytingaruppskot, sum hvørt í sínum lagi hava minni útreiðslur við sær fyri landskassan upp á ávikavist 10, 72 og 106 mió. kr.

Tað eigur at vera viðmerkt, at talan ikki er um beinleiðis sparingar, men einans um at minka um útreiðsluvøksturin. Vøksturin í rakstrarútreiðslunum í framlagda fíggjarlógaruppskotinum frá landsstýrinum í mun til undanfarna fíggjarár er 320 mió. kr., meðan vøksturin eftir tillagingarnar í Fíggjarnevndini er minkaður niður á 256 mió. kr.

Tað er at frøast um, at ein samd Fíggjarnevnd tekur undir við størsta partinum av broytingunum. Hetta er greitt tekin um ein greiðan politiskan vilja í Løgtinginum at fremja neyðugu átøkini.

Fíggjarnevndin er tó eisini samd um, at neyðugt er við munandi størri átøkum komandi árið – átøk sum krevja lógarbroytingar – og vil nevndin tí heita á landsstýrið um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, sum fremja neyðugu tillagingarnar av almenna búskapinum.

Fíggjarnevndin hevur tó ikki avmarkað seg til at tálma vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum, men hevur roynt at tillaga íløguútreiðslurnar soleiðis, at mest møguligt virksemi kann fremjast kring landið. Hetta er m.a. galdandi fyri íløgurnar í eldraøkið, sjúkrahúsverkið, skúlabygningar, vegir, tunlar, flogvøll o.s.fr. Samsvarandi hesum hevur Fíggjarnevndin hækkað íløgunar við 82 mió. kr. í mun til upprunauppskotið frá landsstýrinum.

Eitt av málunum hjá Fíggjarnevndini hevur eisini verið at fremja átøk, sum minka um orkunýtsluna. M.a. er peningur settur av til at *stuðla verkætlanum til alternativa orku* og at *minka um orkunýtslu í almennum bygningum*. Harumframt heitir Fíggjarnevndin á Landsstýrið um at leggja *stuðulin til sethúsabygging* um til ein stuðul til bjálving og til at leggja um til alternativar orkukeldur, soleiðis at privat fólk verða stuðlað at minka um orkunýtsluna. At enda verður heitt á landsstýrið um at leggja pening í bjálvingargrunnin, soleiðis at pensjónistar eisini hava møguleika fyri at minka um orkunýtsluna. Samanlagt heldur Fíggjarnevndin, at hesi átøk eru munagóð í eini umlegging av samfelagnum til eina minni oljunýtslu.

Vísandi til, at broytta málsbýtið ikki er við í fíggjarlógaruppskotinum, hevur Fíggjarnevndin gjørt eitt broytingaruppskot í samráð við Fíggjarmálráðið, og setir ein samd Fíggjarnevnd tí fram soljóðandi:

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) Sum nýggj grein verður sett: ”§ 11. Heilsumál”
2) Sum nýggj grein verður sett: “§ 12. Almannamál”
3) Sum nýggj grein verður sett: “§ 15. Innlendismál”
4) "5-32.1.03. Jarðfeingi" verður broytt til: "6-32.1.03. Jarðfeingi"
5) "5-32.1.04. Søla av seismiskum kanningarúrslitum" verður broytt til: "6-32.1.04. Søla av seismiskum kanningarúrslitum"
6) "5-35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin)" verður broytt til: "6-35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin)"

**7)** "5-35.1.02. Skipaeftirlitið" verður broytt til: "6-35.1.02. Skipaeftirlitið"
**8)** "5-37.2.16. Kolagrevstur" verður broytt til: "6-37.2.16. Kolagrevstur"
**9)** "6-11.1.23. Landsins ognir" verður broytt til: "15-11.1.23. Landsins ognir"
**10)** "6-38.1.02. Landsverk" verður broytt til: "15-38.1.02. Landsverk"
**11)** "6-38.1.07. Nýggir landsvegir" verður broytt til: "15-38.1.07. Nýggir landsvegir"
**12)** "6-38.1.14. Havnir" verður broytt til: "15-38.1.14. Havnir"
**13)** "6-38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum" verður broytt til: "15-38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum"
**14)** "6-38.2.13. Flogferðsla" verður broytt til: "15-38.2.13. Flogferðsla"
**15)** "8-11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið" verður broytt til: "11-11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið"
**16)** "8-11.1.18. Viðlíkahald" verður broytt til: "11-11.1.18. Viðlíkahald"
**17)** "8-11.1.33. Vísindasiðseminevndin" verður broytt til: "11-11.1.33. Vísindasiðseminevndin"
**18)** "8-20.1.04. Upplýsing og ráðgeving" verður broytt til: "11-20.1.04. Upplýsing og ráðgeving"
**19)** "8-20.1.07. Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu" verður broytt til: "11-20.1.07. Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu"
**20)** "8-20.1.10. Koppsetingar" verður broytt til: "11-20.1.10. Koppsetingar"
**21)** "8-20.1.13. Upplýsing um gitnaðarfyribyrging" verður broytt til: "11-20.1.13. Upplýsing um gitnaðarfyribyrging"
**22)** "8-20.1.16. Heilsukanningar av barnakonum" verður broytt til: "11-20.1.16. Heilsukanningar av barnakonum"
**23)** "8-20.1.19. Læknakanningar av børnum" verður broytt til: "11-20.1.19. Læknakanningar av børnum"
**24)** "8-20.2.01. Sjúkrakassar" verður broytt til: "11-20.2.01. Sjúkrakassar"
**25)** "8-20.2.04. Kommunulæknaskipanin" verður broytt til: "11-20.2.04. Kommunulæknaskipanin"
**26)** "8-20.2.05. Útbúgving av yngri læknum" verður broytt til: "11-20.2.05. Útbúgving av yngri læknum"
**27)** "8-20.2.08. Apoteksverkið" verður broytt til: "11-20.2.08. Apoteksverkið"
**28)** "8-20.2.11. Ílegusavnið" verður broytt til: "11-20.2.11. Ílegusavnið"
**29)** "8-20.3.02. Heilsuverkið" verður broytt til: "11-20.3.02. Heilsuverkið"
**30)** "8-20.3.04. Landssjúkrahúsið" verður broytt til: "11-20.3.04. Landssjúkrahúsið"
**31)** "8-20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús" verður broytt til: "11-20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús"
**32)** "8-20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús" verður broytt til: "11-20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús"
**33)** "8-20.3.20. Serviðgerð uttanlands" verður broytt til: "11-20.3.20. Serviðgerð uttanlands"
**34)** "8-20.3.25. Hvíldarheimið Naina" verður broytt til: "11-20.3.25. Hvíldarheimið Naina"
**35)** "8-20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu" verður broytt til: "11-20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu"
**36)** "8-20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi" verður broytt til: "11-20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi"
**37)** "8-20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið" verður broytt til: "11-20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið"
**38)** "8-20.5.01. Lánsafturgjald" verður broytt til: "11-20.5.01. Lánsafturgjald"
**39)** "8-21.1.04. Almannastovan" verður broytt til: "12-21.1.04. Almannastovan"
**40)** "8-21.1.06. KT-heildarskipan til Almannastovuna" verður broytt til: "12-21.1.06. KT-heildarskipan til Almannastovuna"
**41)** "8-21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin" verður broytt til: "12-21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin"
**42)** "8-21.1.08. Alv-skúlin" verður broytt til: "12-21.1.08. Alv-skúlin"
**43)** "8-21.1.10. Teknmálstulkatænastan" verður broytt til: "12-21.1.10. Teknmálstulkatænastan"

**44)** "8-21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark" verður broytt til: "12-21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark"
**45)** "8-21.1.22. Stuðul til feløg" verður broytt til: "12-21.1.22. Stuðul til feløg"
**46)** "8-21.1.23. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys" verður broytt til: "12-21.1.23. Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys"
**47)** "8-21.1.25. Studningur annars" verður broytt til: "12-21.1.25. Studningur annars"
**48)** "8-21.3.01. Barnavernd" verður broytt til: "12-21.3.01. Barnavernd"
**49)** "8-21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti" verður broytt til: "12-21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti"
**50)** "8-21.3.05. Stuðul til uppihaldspening" verður broytt til: "12-21.3.05. Stuðul til uppihaldspening"
**51)** "8-21.3.06. Barnaískoyti" verður broytt til: "12-21.3.06. Barnaískoyti"
**52)** "8-21.3.08. Børn og ung" verður broytt til: "12-21.3.08. Børn og ung"
**53)** "8-21.3.12. Barnatænastan" verður broytt til: "12-21.3.12. Barnatænastan"
**54)** "8-21.3.13. Ættleiðingarstuðul" verður broytt til: "12-21.3.13. Ættleiðingarstuðul"
**55)** "8-21.3.16. Felagið Barnabati" verður broytt til: "12-21.3.16. Felagið Barnabati"
**56)** "8-21.3.18. Ráðgevandi toymi" verður broytt til: "12-21.3.18. Ráðgevandi toymi"
**57)** "8-21.4.01. Dagpeningaskipanin" verður broytt til: "12-21.4.01. Dagpeningaskipanin"
**58)** "8-21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum" verður broytt til: "12-21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum"
**59)** "8-21.5.04. Stuðul til feløg hjá eldri" verður broytt til: "12-21.5.04. Stuðul til feløg hjá eldri"
**60)** "8-21.6.01. Serforsorg" verður broytt til: "12-21.6.01. Serforsorg"
**61)** "8-21.6.02. Bústovnar o.a." verður broytt til: "12-21.6.02. Bústovnar o.a."
**62)** "8-21.6.04. Eldrarøkt" verður broytt til: "12-21.6.04. Eldrarøkt"
**63)** "8-21.6.08. Nærverkið, Meginskrivstovan" verður broytt til: "12-21.6.08. Nærverkið, Meginskrivstovan"
**64)** "8-21.6.10. Ansingarsamsýning" verður broytt til: "12-21.6.10. Ansingarsamsýning"
**65)** "8-21.6.11. Stuðulstænastan" verður broytt til: "12-21.6.11. Stuðulstænastan"
**66)** "8-21.6.13. Vardar íbúðir, rakstrarstudningur" verður broytt til: "12-21.6.13. Vardar íbúðir, rakstrarstudningur"
**67)** "8-21.6.14. Lán til ellis- og røktarheim í Vági" verður broytt til: "12-21.6.14. Lán til ellis- og røktarheim í Vági"
**68)** "8-21.6.16. Eldrasambýli" verður broytt til: "12-21.6.16. Eldrasambýli"
**69)** "8-21.6.17. Serflutningsskipan landsins" verður broytt til: "12-21.6.17. Serflutningsskipan landsins"
**70)** "8-21.6.20. Føroya blindastovnur" verður broytt til: "12-21.6.20. Føroya blindastovnur"
**71)** "8-21.7.01. Vanlig forsorg" verður broytt til: "12-21.7.01. Vanlig forsorg"
**72)** "8-21.8.01. Fólkapensjón" verður broytt til: "12-21.8.01. Fólkapensjón"
**73)** "8-21.8.05. Fyritíðarpensjón" verður broytt til: "12-21.8.05. Fyritíðarpensjón"
**74)** "8-21.8.08. Umsorgararbeiði" verður broytt til: "12-21.8.08. Umsorgararbeiði"
**75)** "8-21.8.10. Einkjubarnastyrkur" verður broytt til: "12-21.8.10. Einkjubarnastyrkur"
**76)** "8-21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar" verður broytt til: "12-21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar"
**77)** "8-21.9.04. Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving" verður broytt til: "12-21.9.04. Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving"
**78)** "14-11.1.28. Løgmálaráðið" verður broytt til: "15-11.1.39. Innlendismálaráðið"
**79)** "14-11.2.07. Lánsafturgjald" verður broytt til: "15-11.2.07. Lánsafturgjald"
**80)** "14-14.1.01. Ymsar útreiðslur" verður broytt til: "15-14.1.01. Ymsar útreiðslur"
**81)** "14-14.1.04. Føroya kærustovnur" verður broytt til: "15-14.1.04. Føroya kærustovnur"

**82)** "14-14.2.02. Dátueftirlitið" verður broytt til: "15-14.2.02. Dátueftirlitið"
**83)** "14-14.3.01. Hin føroyski Happadrátturin" verður broytt til: "15-14.3.01. Hin føroyski Happadrátturin"
**84)** "14-14.3.04. Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting" verður broytt til: "15-14.3.04. Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting"
**85)** "14-14.3.07. Ítróttarvedding" verður broytt til: "15-14.3.07. Ítróttarvedding"
**86)** "14-30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk" verður broytt til: "15-30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk"
**87)** "14-30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir" verður broytt til: "15-30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir"
**88)** "14-30.1.10. Spilloljureinsing" verður broytt til: "15-30.1.10. Spilloljureinsing"
**89)** "14-30.3.01. Lánsafturgjald" verður broytt til: "15-30.3.01. Lánsafturgjald"
**90)** "14-33.2.05. Træplanting" verður broytt til: "15-33.2.05. Træplanting"
**91)** "14-37.2.19. Stuðul til útoyggjamenning" verður broytt til: "15-37.2.19. Stuðul til útoyggjamenning"
**92)** "14-37.4.02. Umhvørvisstovan" verður broytt til: "15-37.4.02. Umhvørvisstovan"
**93)** "14-38.2.01. Strandfaraskip landsins" verður broytt til: "6-38.2.01. Strandfaraskip landsins"
**94)** "14-38.2.04. Tyrlutænastan" verður broytt til: "15-38.2.04. Tyrlutænastan"
**95)** "14-38.2.21. Stuðul til útoyggjar" verður broytt til: "15-38.2.21. Stuðul til útoyggjar"

Landsstýrisins fíggjarætlanarfyritreytir eru fyri rakstrarjáttan: sama upphædd, sum á fíggjarlógini 2008, tó at lønarútreiðslur eru framskrivaðar við 3 pct. Fíggjarnevndin hevur í staðin fyri at nýta játtanina á fíggjarlógini 2008 sum grundarlag, nýtt veruligu nýtslurna fyrstu 11 mánaðirnar í hesum árinum, mettu nýtsluna restina av árinum og harumframt lagt 3 pct. omaná lønirnar. Munnurin á tilgongdunum er sostatt, at meðan landsstýrið hevur tikið støði í játtanini fyri 2008, hevur Fíggjarnevndin tikið støði í veruligu nýtsluni í 2008.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***01-10.1.02.* Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn** | Lógarbundin | *Útt:* | **- 400** |
| | | *Inn:* | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,4 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***01-10.1.03.* Løgtingsarbeiði** | Rakstrarj. | *Útt:* | **- 395** |
| | | *Inn:* | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 395 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***01-10.1.10.* Nýggjur bygningur til Føroya Løgting** | Løguj. | *Útt:* | **- 1.250** |
| | | *Inn:* | **-** |

Nevndin minkar játanina.

**01-10.2.01. Landsgrannskoðanin** Rakstrarj. *Útt:* - 1.080
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,08 mió. kr. ov høg.

**01-10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður** Rakstrarj. *Útt:* - 520
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,52 mió. kr. ov høg.

**02-11.1.02. Løgmansskrivstovan** Rakstrarj. *Útt:* - 500
*Inn:* -

Nevndir heldur, at til ber at skera játtanina við ½ mió. kr.

**02-12.3.01. Løgmaður og landsstýrið** Rakstrarj. *Útt:* + 810
*Inn:* -

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur greitt nevndini frá: "Tá ið fíggjartøl og tekstir vóru latin inn í sambandi við tilfar til løgtingsfíggjarlógina í september 2008, vóru fyritreytirnar fyri virkseminum á hesi konto ikki kendar nóg neyvt, sum tað nú er. Síðani er virksemið eftirroknað, og komið er fram til, at neyðugt er at hækka játtanina."

**03-11.1.03. Fíggjarmálaráðið** Rakstrarj. *Útt:* -
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,0 mió. kr. ov høg.

Í 2009 verða 1 mió. kr. settar av til kanning av fíggjarstýring og -viðurskiftum á almannaøkinum

**03-11.1.36. Sáttmálaviðurskifti** Rakstrarj. *Útt:* - 320
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,32 mió. kr. ov høg.

**03-15.1.07. Føroya gjaldstova** Rakstrarj. *Útt:* - 500
*Inn:* -

Játtanin verður lækkað við 500 tús. kr. vegna ov høga lønarframskriving í fíggjarlógaruppskotinum

**03-15.1.13. Búskaparráðið** Rakstrarj. *Útt:* -
*Inn:* -

Landsstýrismaðurin hevur fyri nevndini greitt frá, at hann ætlar at leggja skrivarafunktiónina

hjá Búskarparráðnum í Landsbankan. Hetta heldur fíggjanevndin er ein góð ætlan og vónar nevndin, at landsstýrismaðurin skjótt fær framt hesa ætlan.

### *03-15.2.01.* Hagstova Føroya

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | *Útt:* | - 450 |
| | *Inn:* | - |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,45 mió. kr. ov høg.

### *03-21.2.01.* Stuðul til flutning og dupult húsarhald

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - 2.500 |
| | *Inn:* | - |

Lógarbroytingin í 2008 við hægri stuðli fyri ferðaútreiðslur hevur gjørt, at nýtslan er nógv vaksin. Landsstýrið ætlar, at lækka stuðulsupphæddirnar nakað fyri at tálma nýtsluni.

### *03-22.4.01.* Stuðul til rentuútreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - |
| | *Inn:* | - |

Útreiðslurnar til hetta endamál vaksa alsamt. Landsstýrismaðurin eigur at gera broytingar í lógini, so at henda gongd verður tálmað, og við framtíðini í huga ikki er ein útreiðsla fyri landskassan.

### *03-22.4.04.* Stuðul til bygging og umvæling av egnum

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - |
| | *Inn:* | - |

Fyri at minka um orkunýtsluna, serliga oljunýtsluna, heldur fíggjanevndin, at landsstýrið eigur at broyta lógina soleiðis, at stuðulin einans verður latin til orkusparandi átøk innan bygging.

Hesi átøk kunnu t.d. vera:
- bjálving, fyri at minka um orkunýtsluna
- alternativ upphiting, so sum sólorka, hitapumpa, vindorka

### *05-11.1.05.* Fiskimálaráðið

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | *Útt:* | - 5.443 |
| | *Inn:* | - |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 2,043 mió. kr. ov høg.

Fiskimálaráðið er í løtuni í gongd við at gera nýggja skipan til umsiting av fiskiloyvum og til skráseting av skipum og bátum. Umleið 1,3 mió. kr. verða brúktar til hetta endamál í 2008. Fyri at gera skipanina lidna verður neyðugt við 1,6 mió. kr. í 2009, harav 300 tús. kr. verða játtaðar av høvuðskontu 6.35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin).

Játtan mió. kr. 3.750 til nýggja verðurtænastu verður sett á sjálvstøðuga konto

### *05-11.1.34.* Granskingarætlanir

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | *Útt:* | - 1.200 |
| | *Inn:* | - |

Ætlanin er at skipa eina granskingarkjarnu innan fiskivinnubúskap. Upprunaliga var ætlanin, at fiskivinnubúskapur skuldi koma inn sum ein fjórða kjarna, men landsstýrið hevur gjørt

semju um at fara burtur frá hesi ætlan. Tískil verður farið aftur til játtanina frá 2007 við trimum kjarnum. Tað liggur ikki fast enn, hvussu kjarnurnar verða skipaðar í 2009, men tað er greitt, at fiskivinnubúskapur verður ein av kjarnunum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-31.1.07.*** **Veðurtænastan** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **+ 3.750** |

Flutt frá Fiskimálaráðnum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-33.2.11.*** **Almenn jørð, søla** | Løguj. | ***Útt:*** | **- 15.000** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Ætlanin er at fáa meira fyri almenna jørð.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.2.01.*** **Fiskiveiðieftirlitið** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **- 3.577** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 3,577 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.3.06.*** **Nýtt havrannsóknarskip** | Løguj. | ***Útt:*** | **+ 800** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Hetta er játtan til at gera sáttmálaprojektið liðugt.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.4.01.*** **Inntøkutrygd hjá fiskimonnum** | Lógarbundin | ***Útt:*** | **- 4.000** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Tað er trupult at gera eina meting av, hvussu stór inntøkutrygdin verður í 2009. Nýggjastu tølini (pr. oktober 2008) vísa eina eitt sindur positivari gongd enn upprunaliga mett. Nýggjasta metingin er tískil 4 mió. kr. lægri ella 24 mió. kr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.4.04.*** **Sjúkratrygd** | Lógarbundin | ***Útt:*** | **- 1.500** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,5 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.4.22.*** **Flutningsstuðul** | Lógarbundin | ***Útt:*** | **- 1.500** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ætlar at gera broytingar í skipanini.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-35.1.03.*** **Trygdarmiðstøðin** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **0** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Skeiðsgjaldið er sett upp úr 1.000 kr. í 1.500 kr. Mett verður, at inntøkan hækkar við 500 tkr.

Fyri framhaldandi at lúka treytirnar fyri ISO-góðkenning verður fundament gjørt til nýggjan "David" uppi á Borðoyarvík, umframt at fyrireikinganar at byggja nýggja Trygdarmiðstøð í Klaksvík eiga at

halda fram.

**06-11.1.06. Vinnumálaráðið** Rakstrarj. *Útt:* - 1.750
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,75 mió. kr. ov høg.

**06-11.1.16. Viðlíkahald** Rakstrarj. *Útt:* - 200
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,2 mió. kr. ov høg.

**06-21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið** Rakstrarj. *Útt:* - 378
*Inn:* -

Landsstýrið hevur boðað frá, at kunngerð nr. 116 frá 1996 um gjald fyri avgreiðslu av vanlukkutryggingarmálum verður broytt (dagførd) soleiðis, at gjaldið fyri málsavgreiðslu svarar á leið til útreiðslurnar av at umsita økið. Soleiðis verður játtanin útreiðsluneutral.

Fyrisitingarútreiðslurnar verða sostatt fíggjaðar við gjøldum.

**06-32.1.03. Jarðfeingi** Rakstrarj. *Útt:* - 2.000
*verður flutt frá § 5* *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 2 mió. kr. ov høg.

**06-32.1.09. SeWave** *Útt:* - 300
*Inn:* -

Játtanin verður strikað.

Verkætlanir av hesum slag kann játtast framyvir av konto 15-34.4.07 Orkumál.

**06-33.1.04. Djóralæknatænastur** Rakstrarj. *Útt:* + 200
*Inn:* -

**06-35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin)** Rakstrarj. *Útt:* + 300
*verður flutt frá § 5* *Inn:* -

Ein EDV- verkætlan, sum hevur verið framd í Fiskimálaráðnum, heldur fram á Skipaskrásetingini, og eru 300 tús. kr. játtaðar (fluttar) til endamálið.

Endamálið er at gera ein felags dátugrunn, sum fatar um øll skip, soleiðis at neyðugar upplýsingar fáast (eru skrásettar) í einari skipan og á einum staði. Eitt nú verða øll teknisk viðurskifti skrásett, herímillum skipastødd, vekt og motororka, umframt fíggjarligar bindingar, pant o.t. Hetta skapar størri gjøgnumskygni eisini hjá borgarum, betri hagtalsgrundarlag, og lættir um fyrisitingina innan sjóvinnu.

**06-35.1.02. Skipaeftirlitið** Rakstrarj. *Útt:* - 700
*verður flutt frá § 5* *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,7 mió. kr. ov høg.

**06-36.1.07. Fiskasjúkutænastur** Rakstrarj. *Útt:* - 1.399
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,643 mió. kr. ov høg.

Játtanin á undirkontu 20. er til at samsýna djóralæknum, sum røkja heilsuskipanir fyri landið fyri at basa møguligum fiskasjúkum. Smoltstøðir og alistøðir verða eftirkannaðar regluliga. Skipanin verður nú broytt soleiðis, at alarar sjálvir gjalda fyri tænasturnar.

Skipanin verður fíggjað av alivinnuni, og gevur hetta eina minniútreiðslu upp á tkr. 756

**06-37.1.08. Loyvisnevndin** Rakstrarj. *Útt:* - 50
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 50 tkr. ov høg.

Játtanin er til at fíggja raksturin av loyvisnevndini. Kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1993 um skeinkingarloyvi verður broytt soleiðis, at gjøldini fyri málsavgreiðslu svara á leið til útreiðslurnar av at umsita málsøkið. Inntøkurnar, sum standa á § 20 Inntøkur, hækka samsvarandi.

**06-37.1.10. El-nevndin** Rakstrarj. *Útt:* - 50
*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 50 tkr. ov høg.

Játtanin er til at fíggja raksturin av el-nevndini. Løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað verður broytt soleiðis, at árliga gjaldið hjá løggildum el-innleggjarum verður hækkað, soleiðis at gjøldini fyri at fyrisita málsøkið svara á leið til útreiðslurnar. Inntøkurnar standa á § 20. Inntøkur.

**06-37.1.15. Brúkaraumboð** Rakstrarj. *Útt:* + 1.200
*Inn:* -

Løgtingslóg nr. 19. frá 8. mai 2008 um marknaðarføring kemur í gildi 1. januar 2009. Endamálið er at tryggja góðan marknaðarføringssið vit atliti at brúkaranum, vinnurekandi og samfelagnum. Brúkaraumboð verður stovnað.

**06-37.1.17. Kappingarráðið** Rakstrarj. *Útt:* - 782

***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,782 mió. kr. ov høg.

### *06-37.1.18.* Skráseting Føroya

Rakstrarj. ***Útt:*** **+ 174**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,326 mió. kr. ov høg.

Dentur verður langdur á at menna FAS- skipanina soleiðis, at hon verður ein kappingarfør vinna. Játtanin verður tí hækkað við 1,5 mió. kr.

Aliloyvi verða løgd til Skráseting Føroya at umsita.

Landið fyrisitur aliloyvi, sum ásett í § 2. í "alilógini" frá 3. apríl 2001. Aliloyvi kunnu verða latin partafeløgum og smápartafeløgum. Ymiskar treytir verða settar í hesum sambandi. Fyrisitingin verður fíggjað við gjøldum.

### *06-37.5.04.* Heilsufrøðiliga starvsstovan

Rakstrarj. ***Útt:*** **- 1.200**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 400 tkr. ov høg.

Størri partur av virkseminum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni verður fíggjaður við at áseta gjøld fyri nakrar tænastur, sum higartil hava verið ókeypis, umframt at hækka nøkur verandi gjøld. Inntøkur stovnsins hækka tískil við 2,3 mió. kr. Av hesum verða umleið 1,5 mió. kr. nýttar til at fremja í verki ásetingar í ES lóggávu, sum galda í Føroyum

### *06-38.2.01.* Strandfaraskip landsins

Landsf. ***Útt:*** **- 7.300**
*verður flutt frá § 14* ***Inn:*** **-**

Nettoútreiðslurnar hjá landsfyritøkuni í 2009 verða mettar til 120,7 mió. kr. Hetta er ein lækking upp á 7,3 mió. kr. í mun til játtanina í 2008. Fleiri broytingar, bæði meirkostnaður og minnikostnaður eru grundarlag fyri játtanini.

Minkingin frá 2008 til 2009 stavar frá lægri útreiðslum til fráfaringarløn, flyting til Tvøroyrar, eykasigling um Skopunarfjørð, íalt 4,4 mió. kr. Harumframt verður roknað við lækking í oljuprísinum upp á 6,0 mió. kr. og við bygnaðarbroytingum upp á 1,0 mió. kr. Íalt 11,4 mió. kr.

Økingin stavar frá hægri sáttmálakostnað fyri Bygdaleiðir og útskifting av Power Management skipanin umborð á Smyrli. Íalt 4,1 mió kr.

### *06-38.2.03.* Strandfaraskip landsins

Løguj. ***Útt:*** **+ 3.500**
***Inn:*** **-**

Eftir ætlan verður farið undir at byggja eitt nýtt skip til Fugloyar-/Nólsoyarfarleiðina.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-38.2.09.* Vága floghavn** | Løguj. | ***Útt:*** | **- 1.100** |
| | | ***Inn:*** | **+ 3.500** |

Eftir fíggjarlógaruppskotinum skal landið gjalda fyri ognartøku av lendi og nakað av útgerð í sambandi við, at trygdarhegn skal setast upp kring flogvøllin. Nú er ætlanin, at P/F Vága floghavn skal gjalda hesar útreiðslur.

Sambært galdandi trygdarkrøvum skal eitt trygdarhegn vera kring flogvøllin. Trygdargeirin á suðursíðuni er ikki nóg breiður, og er tí neyðugt at ognartaka eitt lendi upp á einar 60.000 fermetrar til tess at kunna gera arbeiðið liðugt. Tað verður mett til at kosta einar 3,5 mió. kr.

Landsverk fremur ognartøkuna av lendinum fyri Vága floghavn. Partafelagið rindar fyri og fer at eiga ognina.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-38.2.13.* Flogferðsla** | Løguj. | ***Útt:*** | **- 2.000** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Játtan verður útsett.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-38.2.23.* Sandoyartunnil** | Løguj. | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Av hesi játtan kann landsstýrið fara undir at seta á stovn eitt partafelag.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-39.1.01.* Semingsmannaskipanin** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **- 100** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,1 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-39.1.02.* Fastur gerðarættur** | | ***Útt:*** | **- 100** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Fíggjarnevndin vísir á upprunaligu ætlanina um inntøkufíggjað virksemi.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-39.1.07.* Arbeiðseftirlitið** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **- 1.875** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,675 mió. kr. ov høg.

Størri parturin av virkseminum hjá Arbeiðseftirlitinum verður inntøkufíggjaður. Gjaldast skal fyri nakrar tænastur, sum hava verið ókeypis higartil, og onnur gjøld hækka nakað. Inntøkur stovnsins hækka tískil við 1,2 mió. kr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***06-39.4.04.* Umsiting av barsilsskipan** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **- 450** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,45 mió. kr. ov høg.

***07-11.1.09.*** **Mentamálaráðið** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 740**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,74 mió. kr. ov høg.

***07-23.1.10.*** **Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 640**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,64 mió. kr. ov høg.

***07-23.1.12.*** **KT í skúlaverkinum** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 680**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,68 mió. kr. ov høg.

***07-23.1.16.*** **Skúlabókagrunnurin** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 500**
***Inn:*** **-**

Fíggjarnevndin ásannar, at hóast stóra framleiðslu av bókum, halda inntøkumetingarnar als ikki. Tí er alneyðugt, at skúlabókagrunnurin fer undir miðvísa marknaðarføring av framleiðsluni.

***07-23.1.31.*** **Próvtøkur** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 330**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,33 mió. kr. ov høg.

***07-23.1.34.*** **Eftirútbúgving og skeið** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 200**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,2 mió. kr. ov høg.

***07-23.2.01.*** **Fólkaskúlin** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 5.000**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 5.000 mió. kr. ov høg.

***07-23.2.02.*** **Sernámsdepilin** Rakstrarj. ***Útt:*** **+ 500**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1.500 mió. kr. ov høg.

Undirkonta 22. NSR-tænastan (náms- og sálarfrøðilig ráðgeving)
Sernámsfrøðiligar tænastueindir verða skipaðar í økjum kring landið í samstarvi við kommunurnar. Játtanin er hækkað 2 mió. kr. til at útbyggja NSR-tænastuna kring landið í 2009.

***07-23.2.06.*** **Skúlatilboð til ung við breki** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 300**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,3 mió. kr. ov høg.

***07-23.2.08.*** **Eftirskúlar** Løguj. ***Útt:*** **+ 2.000**
***Inn:*** **-**

Landsstýrið hevur heitt á fíggjanevndina um at seta 2 mió. kr. av til eftirskúla treytað av, at stigtakararnir eisini játta sín part av kostnaðinum.

***07-23.3.05.*** **Miðnámsútbúgvingar** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 7.195**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 7,195 mió. kr. ov høg.

***07-23.3.06.*** **Skúladepil í Suðuroy** Løguj. ***Útt:*** **- 1.000**
***Inn:*** **-**

Biðið er um eykajáttan í 2008 at gera skúlan lidnan fyri, tí er ikki neyðugt við meiri játtan í 2009.

***07-23.3.07.*** **Tekniski skúli í Klaksvík** Løguj. ***Útt:*** **+ 1.000**
***Inn:*** **-**

Játtanin er ætlað til høli á skúlanum, sum krevja umvælingar og broytingar í samband við, at nýggjur skúli er bygdur afturat verandi. (1,0 mió kr)

***07-23.3.08.*** **Fiskivinnuskúlin** Løguj. ***Útt:*** **- 600**
***Inn:*** **-**

Biðið er um eykajáttan í 2008 at gera skúlan lidnan, tí er ikki neyðugt við meiri játtan í 2009.

***07-23.3.09.*** **Skúladepil í Marknagili** Løguj. ***Útt:*** **- 8.000**
***Inn:*** **-**

Játtanin í 2009 skal nýtast til fyrireikandi arbeiði og projektering í sambandi við bygging av skúladepli í Tórshavn. Mett verður, at arbeiðið í 2009 kemur at kosta 12 mió. kr. Fyrireikingararbeiðið kemur at strekkja seg inn í alt 2010 og eisini ein part av 2011.

***07-23.5.07.*** **Frítíðarundirvísing** Rakstrarj. ***Útt:*** **- 300**
***Inn:*** **-**

Flutt til 23.5.12

**07-23.5.12. Stuðul til lesi og skrivi veik** *Útt:* + 600 *Inn:* -

Játtanin skal nýtast til at styrkja um tað arbeiðið, sum higartil hevur verið gjørt sjálvboðið.

**07-23.6.03. Klaksvíkar sjómansskúli** Løguj. *Útt:* + 1.000 *Inn:* -

Peningurin verður játtaður til framhald av umvæling og nýgerð av køki og øðrum hølum til kokkaútbúgvingina á Klaksvíkar Sjómansskúla. 1,0 mió kr.

**07-23.6.04. Klaksvíkar sjómansskúli** Rakstrarj. *Útt:* + 300 *Inn:* -

Nýggjur sjóvinnuflokkur byrjar í januar, tí er neyðugt við øktari játtan.

**07-23.6.05. Vinnuháskúlin** Rakstrarj. *Útt:* - 2.217 *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 3,217 mió. kr. ov høg.

Landsstýrið hevur boðað frá, at skúlin bert fer at taka lesandi inn eina ferð árliga, og ætlanin við einum fyrireikingarflokki til hægri lestur verður ikki sett í verk í 2009.

**07-23.6.13. Læraraskúlin** Rakstrarj. *Útt:* - 800 *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 800 tús. kr. ov høg.

**07-23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya** Rakstrarj. *Útt:* - 4.038 *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 5,300 mió. kr. ov høg.

Játtanin til Granskingardepilin fyri økismenning verður bólkað saman við játtanini til Fróðskaparsetrið, tvs fluttar verða 1,262 mió. kr. av kontu 07-23.6.23

**07-23.6.20. Granskingarráð Føroya** Rakstrarj. *Útt:* - 530 *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,53 mió. kr. ov høg.

**07-23.6.23. Ymiskar verkætlanir** Rakstrarj. *Útt:* - 1.262 *Inn:* -

Játtanin til Granskingardepilin fyri økismenning verður bólkað saman við játtanini til Fróðskaparsetur Føroya, tí verkætlanin er løgd saman við Fróðskaparsetrinum 1. januar 2008.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-23.7.04.* Lestrarstudningur** | Lógarbundin | ***Útt:*** | **- 3.000** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Nýggj meting av kostnaðinum av lestrarstuðlinum fyri 2009 vísir, at sparast kunnu uml. 3 mió. kr., tí at SU í Danmark er farið at veita skúlagjaldsstuðul til ávísar hægri útbúgvingar uttanfyri norðurlond.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.1.13.* Ymiskir studningar** | | ***Útt:*** | **+ 400** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Nýggj undirkonto 07 skótarørsla upphædd 400 tkr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.2.01.* Tónleikur og sangur** | | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

0,45 mió. kr. skulu nýtast til skúlasongbók hjá sanglærarafelagnum.

Undirkonto 01 er ætlað at stuðla og menna tónleik og sang í Føroyum m.a. 200 tkr. til Landsfelagið fyri føroyskan dans.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.2.04.* Mentanargrunnur** | | ***Útt:*** | **- 500** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

500 tkr. verða fluttar á kontu 07-24.2.08

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.2.08.* Týðaragrunnur Landsins** | | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **+ 500** |

500 tkr. verða fluttar av kontu 07-24.2.04
Grunnurin verður umsitin av umsiting Mentanargrunsins.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.3.13.* Føroya náttúrugripasavn** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **+ 3.253** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Føroya náttúrugripasavn verður skilt út frá 15.37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarjáttan) á egna høvuðskontu.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.3.20.* Menning av mentan og mentanararvi** | Rakstrarj. | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Av hesi konto kann veitast stuðul til Krígssavnið í Vágum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***07-24.4.06.* Kringvarp Føroya** | Landsf. | ***Útt:*** | **-** |
| | | ***Inn:*** | **-** |

Nevndin heldur tað verða rættast at seta á fíggjarlógina eina C-átekning.

C-átekning til knt 07-24.4.06.: Hóast ásetingina í § 9, stk. 4 í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, kann Kringvarpið fáa gjaldføri úr landskassanum at fíggja gjaldførishall í fíggjarárinum. Gjaldførið, sum Kringvarpið fær útvegað úr landskassanum, skal verða afturgoldið í seinasta lagi 31. desember 2009.

Viðmerking: Við ásetingini í § 9, stk. 4 í kringvarpslógini fær Kringvarpið heimild at flyta eitt møguligt rakstraravlop ella hall til næsta roknskaparár, og fær Kringvarpið harvið sítt egna gjaldføri. Tað er tí ivasamt, um Kringvarpið hevur heimild at útvega sær gjaldføri úr landskassanum á sama hátt sum aðrar landsfyritøkur. C-átekningin hevur til endamáls at loysa gjaldføristrupulleikarnar, sum Kringvarpið væntandi kemur í í fíggjarárinum 2009.

***07-24.6.08.* Hugasamband Føroya** — ***Útt:*** **+ 200**
***Inn:*** **-**

Peningurin verður játtaður til at stuðla Hugasambandinum.

***07-24.6.12.* Ítróttaranlegg** — ***Útt:*** **-**
***Inn:*** **-**

Av hesi játtan kann 1. mió. verða nýtt til projektering av ítróttarhøll í Sandoynni

***07-38.3.10.* Kringvarpssendistøðir** — Løguj. — ***Útt:*** **+ 4.000**
***Inn:*** **-**

Verklagslóg um at byggja sjónvarpssendinet verður løgd fyri Løgtingið. Avsettar eru 4 mió. kr. sum ávegisgjald í 2009 til at byggja út sjónvarpssendinetið.

***11-11.1.08.* Almanna- og heilsumálaráðið** — Rakstrarj. — ***Útt:*** **- 26.761**
*verður flutt frá § 8* — ***Inn:*** **-**

Verandi samgonga hevur avgjørt, at tveir landsstýrismenn skulu umsita ávikavist almannamál og heilsumál. Í hesum sambandi verður Almanna- og heilsumálaráðið býtt sundur í tvey ráð, Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið. Høvuðskonta 11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið verður niðurløgd, og játtanin verður flutt til høvuðskonturnar 11.1.24. Heilsumálaráðið og 11.1.26. Almannamálaráðið.

***11-11.1.18.* Viðlíkahald** — Rakstrarj. — ***Útt:*** **- 5.574**
*verður flutt frá § 8* — ***Inn:*** **-**

Í sambandi við, at Almanna- og heilsumálaráðið er býtt sundur í Almannamálaráð og Heilsumálaráð, verða 3.422 tús. kr. av kontuni fluttar til almannaøkið og 2.152 tús. kr. av kontuni til heilsuøkið.

***11-11.1.24.* Heilsumálaráðið** — Rakstrarj. — ***Útt:*** **+ 15.624**
***Inn:*** **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 3,02 mió. kr. ov høg.

Í sambandi við, at Almanna- og heilsumálaráðið er býtt í tvey, er játtanin býtt millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið út frá meginreglum um helvtarbýti í flestu førum. Ráðini hava avgjørt at hava nógvar felags funktiónir fyri á henda hátt at gera raksturin so skynsaman sum møguligt.

Heilsumálaráðið hevur saman við Almannamálaráðnum felags HR-deild, KT-deild og tænastueind umframt eina stápseind.

Felagseindirnar eru býttar millum ráðini soleiðis, at øll starvsfólk hava eina greiða tilvísing, og er munurin á útreiðslunum til felagseindirnar útjavnaður í innanhýsis flyting millum ráðini. Játtanin til lønir og beinleiðis starvsfólkaútreiðslur er býtt eftir talinum av starvsfólkum. Játtanin til aðrar rakstrarútreiðslur er javnt býttar ímillum ráðini.

### *11-11.1.32.* Viðlíkahald

Rakstrarj. *Útt:* **+ 2.152**
*Inn:* **-**

Í sambandi við at Almanna- og heilsumálaráðið er býtt sundur í Almannamálaráð og Heilsumálaráð, verða 2.152 tús. kr. av høvuðskontuni 11.11.1.18. Viðlíkahald fluttar til heilsuøkið.

### *11-11.1.33.* Vísindasiðseminevndin

Rakstrarj. *Útt:* **- 75**
*Inn:* **-**

*verður flutt frá § 8*

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 75 tkr. ov høg.

### *11-20.1.04.* Upplýsing og ráðgeving

Rakstrarj. *Útt:* **- 825**
*Inn:* **-**

*verður flutt frá § 8*

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 0,575 mió. kr. ov høg.

Í sambandi við at Almanna- og heilsumálaráðið er býtt sundur í Almannamálaráð og Heilsumálaráð, verða 250 tús. kr. av kontuni fluttar til almannaøkið vegna undirkontu 27. SSP-samstarv.

### *11-20.1.10.* Koppsetingar

Lógarbundin *Útt:* **+ 1.000**
*Inn:* **-**

*verður flutt frá § 8*

Fíggjarnevndin ynskir at játtan verður avsett, soleiðis at tað ber til at fara undir at koppseta ungar gentur ímóti lívmóðurhálskrabbameini. Miðað verður eftir, at allar gentur í aldrinum 12-15 ár frameftir verða koppsettar móti lívmóðurhálskrabba.

### *11-20.1.19.* Læknakanningar av børnum

Lógarbundin *Útt:* **- 400**
*Inn:* **-**

*verður flutt frá § 8*

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 400 tkr. ov høg.

**11-20.2.01. Sjúkrakassar** | Útt: - 6.000

*verður flutt frá § 8* | Inn: -

Arbeitt verður við at minka um stuðulin hjá tí almenna til sjúkrakassarnar, samtíðis sum ætlanin er at broyta tilskotið til heilivág úr 75% niður í 50%.

Ásetingar um tilskot eru at finna í kunngerð nr. 145 frá 2. juli 1993 um skrá yvir heilivágssløg, sum er heimilað tilskot, seinast broytt við kunngerð nr. 146 frá 14. desember 2001.

Samlaðu útreiðslurnar hjá sjúkrakassunum til heilivág vóru í 2007 53,7 mió. kr., og mett er, at ein lækking av sjúkrakassagjaldinum úr 75% niður í 50% gevur landskassanum eina bruttosparing á umleið 11,6 mió. kr. Ætlanin er, at skerjingin ikki skal raka pensjónistar og fólk við varandi sjúkum, sum brúka nógvan heilivág. Hetta hevur við sær, at útreiðslurnar hjá Almannastovuni til heilivág fara at økjast. Roknað er við, at ein triðingur av sparingini verður meirútreiðsla hjá Almannastovuni, og tí er nettosparingin sett til 6,0 mió. kr.

Arbeitt verður við at fyrireika tilfar hesum viðvíkjandi, so málið kann verða klárt til 1. mars.

**11-20.2.05. Útbúgving av yngri læknum** Rakstrarj. | Útt: + 2.100

*verður flutt frá § 8* | Inn: -

Játtanin er til at styrkja útbúgvingina av kommunulæknum og sjúkrahúslæknum í Føroyum. Ein partur av játtanini skal nýtast til tvungið skeiðsvirksemi. Játtanin ber ikki útreiðslurnar av at skipa starvsvenjingina.

Víst hevur verið á, at játtanin til útbúgving av yngri læknum er ov tepur. Í hesum sambandi hevur verið víst á, at útbúgvingargongdin er broytt. Tá útbúgvingin í almenn medisin byrjaði í Føroyum, tók útbúgvingin tilsamans 3½ ár, harav 1 ár hjá kommunulækna. Síðani er serlæknaútbúgvingin broytt til, at útbúgvingin tekur í alt 5 ár. Hetta merkir, at útbúgvingin er broytt frá at vera 1 ár hjá kommunulækna til at innihalda 2½ ár úti hjá kommunulækna. Hetta hevur havt við sær eitt økt trýst á kontuna. Tað er danska heilsustýrið, ið skipar útbúgvingina.

Mælt er til, at játtanin fyri 2009 verður sett til 5,4 mió. kr.

Hin parturin av nýtsluni á útbúgvingarkontuni er viðvíkjandi teimum heilt nýútlærdu læknunum, sum skulu í ”klinisk basisuddannelse”, fyrr kallað turnuslæknar. Hesir læknar skulu sum fyrsta útbúgvingarskeið setast í 1 ár partvís á sjúkrahúsi og partvís hjá kommunulækna. ”Det nationale Råd for lægers videreuddannelse” mælir til, at 80% av hesum hjálparlæknum skulu hava ½ ár hjá kommunulækna. Hetta merkir ikki eina varandi øking í árligu nýtsluni av útbúgvingarkontuni, men fyri árini 2009 og 2010, har gamla og nýggja skipanin umskarast, verður nýtslan nakað størri.

Biðið verður um, at játtanin verður økt við 2,1 mió. kr., soleiðis at 1,65 mió. kr. verða fluttar frá høvuðskontu 11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan), 250 tús. kr. frá høvuðskontu 11.20.3.10 Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan) og 200 tús. kr. verða fluttar frá høvuðskontu 8.20.3.15 Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***11-20.2.09.* Apoteksverkið** | Løguj. | *Útt:* | **+ 4.000** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

Sambært verklagslóg, sum liggur í tinginum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***11-20.3.02.* Heilsuverkið** | Rakstrarj. | *Útt:* | **- 2.000** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

Fíggjarnevndin heldur ikki tað verða rætt í hesum tíðum at skipa nýggjar stovnar

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***11-20.3.04.* Landssjúkrahúsið** | Rakstrarj. | *Útt:* | **+ 4.775** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

Fíggjanevndin hedur at økispsykriatriin eigur at raðfestast við tkr. 800.

Fíggjarnevndin heldur, at aftaná: "Kanningin av fíggjarviðurskiftunum í sjúkrahúsverkinum" er gjørd, eiga sjúkrahúsini at fremja eina sparing upp á 10 pct. býtt yvir árini 2010-2012, við 3 pct. 2010 og 2011 og 4 pct. 2012. Landsstýrismaðurin eigur at taka hesa sparing við, tá ið uppskot til fíggjarlóg verður gjørt fyri 2010.

Landsstýrismaðurin hevur greitt nevndin frá: " Játtanin til Landssjúkrahúsið verður økt við 2.800 tús. kr. til lønarhækkingar, 3.000 tús. kr. til øktar heilivágsútreiðslur og við 2.050 tús. kr. til hækkaðar útreiðslur til rannsóknarstovukanningar, viðgerðarvørur og tøknieftirlit. Harumframt verður játtanin økt við 400 tús. kr. í sambandi við nýggja psykiatrilóg.

Biðið verður um, at fluttar verða 1,65 mió. kr. av høvuðskontu 11.20.3.04 Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan) til høvuðskontu 11.20.2.05 Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan).

Roknað verður við, at Landssjúkrahúsið fer at hava 500 tús. kr. í inntøkum í sambandi við gjald fyri viðgerðir í sjúkrahúsverkinum. Reglur verða ásettar um gjald fyri viðgerð av útlendingum í sjúkrahúsverkinum, og er hetta metta inntøkan í hesum sambandi. Heimild er í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið at gera hesar ásetingar í kunngerð.

Tey 10 røktarheimsplássini, sum hava verið á Landssjúkrahúsinum, verða flutt undir Nærvekið. Útreiðslur og inntøkur í undirkontu 20 vanligt virksemi minka tí við 4.716 tús. kr.

Undirkonta 50. Inntøkufíggjað virksemi (Hoyritól) er flutt til almannaøkið. Útreiðslurnar 1.496 tús. kr. í sambandi við rakstur av hoyritólavirkseminum verða fluttar frá 12.21.7.01 Vanlig forsorg til Landssjúkrahúsið.

Landssjúkrahúsinum er álagt at spara 3,1 mió. kr. Fyri at kunna røkka hesi upphædd er ein ætlan gjørd fyri at tálma útreiðslunum. Henda ætlan inniheldur millum annað, at arbeiðið verður betri skipað í sambandi við liðugt viðgjørdir sjúklingar, at sjúklingaflutningurin til og úr Sandoynni verður umskipaður frá Strandferðsluni til MRCC, at heilivágsstýringin verður betri og aðrar umleggingar innan t.d. tænastuøkið.

Avtalan, sum varð flutt til Landssjúkrahúsið, viðvíkjandi barna- og ungdómspsykiatriini kom at kosta meir enn væntað. Tí verða 280 tús. kr. fluttar frá Serviðgerð uttanlands til Landssjúkrahúsið

**11-20.3.06. Medicoteknisk tól** Løguj. *Útt:* + 7.500

*verður flutt frá § 8* *Inn:* -

Neyðugt er støðugt at endurnýggja tólútbúnaðin hjá sjúkrahúsunum, sum er gamal og niðurslitin. Arbeitt verður við at samskipa íløgurnar hjá øllum trimum sjúkrahúsunum. Játtanin er ætlað bæði til medicoteknisk tól og sjúkrabilar.

**11-20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging** Løguj. *Útt:* + 35.000

*verður flutt frá § 8* *Inn:* -

Heitini á bygningunum eystan fyri J.C.Svabosgøtu, hoyrandi til Landssjúkrahúsið, eru: A-bygningurin, ið er gamla Dronning Aleksandrines Hospital, B-bygningurin, ið er høgi bygningurin, C-bygningurin, sum røkkur frá B-bygninginum niðan móti J.C.Svabosgøtu, E-bygningurin, er barakkin fram við J.C.Svabosgøtu, og G-bygningurin, sum er nýggjasti bygningurin.

Íløguætlan fram til 2015
Í 1998 varð farið undir at fyrireika 1. stig av eini komandi út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum. Samstundis varð farið undir at gera eina byggiætlan, sum skuldi lýsa framtíðar tørv og ætlanir annars fyri nútíðargerð av Landssjúkrahúsinum. Sum ein liður av tørvsmetingini varð eisini gjørd ein kanning av verandi bygningum hjá Landssjúkrahúsinum, og úrslitið varð nágreiniliga lýst í eini støðisfrágreiðing.

Grundað á tað gjørda forarbeiðið, varð ein íløguætlan gjørd, sum fekk politiska undirtøku. Samlaði íløgutørvurin varð mettur til 500 mió. kr. í 1999 krónum, útgerð og innbúgv ikki íroknað. Byggiætlanin er síðani endurskoðað, og í samsvari við eina dagføring av íløgutørvinum vórðu í 2006 játtaðar 105 mió. kr. til endamálið at nýta í fíggjarárunum 2006, 2007 og 2008. Við árslok 2007 vóru nýttar 70,3 mió. kr. av hesi upphæddini, og tær írestandi 34,7 mió. kr. verða nýttar í 2008.

Íløgutørvurin er nú endurskoðaður av nýggjum, og orsakað av tí hækkaða kostnaðarstøðinum verður roknað við, at neyðugt verður við eini samlaðari upphædd tey næstu 3 árini upp á 150 mió. kr.

Útbygging, umbygging og umvæling av Landssjúkrahúsinum
Tá G- og B-bygningarnir vórðu samanbundnir í 2005 við nýggjari forhøll við móttøku og kafeteria, varð farið undir at gera nýggjan sterilsentral á B3 og at umbyggja B2 til skopideild og kirurgiskt ambulatorium. Virksemið á B2 og B3 er beinleiðis knýtt at virkseminum í G-bygninginum. Hesi arbeiði vórðu liðug í 2008. Arbeiðið við at umvæla tær ovastu 5 hæddirnar innan í B-bygninginum varð somuleiðis liðugt í 2008.

Arbeiðið at renovera útsíðurnar á B-bygninginum, ið eru í sera ringum standi, verður meir umfatandi, enn roknað varð við. Prosjekteringin varð liðug á sumri í 2008, og arbeiðið útboðið á heysti 2008. Arbeiðið verður væntandi liðugt á sumri í 2010.

Í 2008 varð farið undir at fyrireika næstu útbygging av Landssjúkrahúsinum, ið verður ein víðkan av B-bygninginum, og verkætlanin verður prosjekterað í 2009 og útboðin í byrjanini av 2010. Eftir ætlan verður arbeiðið liðugt í 2013. Í hesum sambandi verður C-bygningurin, ið er niðurslitin, tikin niður.

Psykiatriski depilin skal nýmótansgerast. Ein byggiskrá er gjørd og skal til politiska viðgerð, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvussu umfatandi út- og/ella umbyggingin skal verða.

Tænastubygningarnir eru í ringum standi, og roknast má við at nýta nakað av peningi til neyðugar umvælingar.

Samandráttur
Landsstýrið hevur yvirfyri Fíggjarnevndini sett fram ynski um, at 40 mió. kr. verða settar av. Stórur partur av hesi játtan fer til gerð av nýggjum útsíðum á B-bygninginum. Eisini fer ein munandi partur av hesi játtan til prosjektering av næstu útbygging av somatisku deildunum á Landssjúkrahúsinum og til framhaldandi fyrireiking av eini nýggjari psykiatriskari deild, meðan nakað verður nýtt til umvælingar av tænastubygningunum.

Arbeitt verður við eini nýggjari verklagslóg sambært langtíðarætlanini fyri út- og umbyggingini av Landssjúkrahúsinum.

## *11-20.3.10.* Klaksvíkar sjúkrahús

| | Rakstrarj. | *Útt:* | **+ 1.834** |
|---|---|---|---|
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

Játtanin verður økt við 600 tús. kr. til lønir og 950 tús. kr. til rakstrarframskrivingar. Tilsamans verður játtanin økt við 1,55 mió. kr.

Klaksvíkar sjúkrahúsi er álagt at spara 400 tús. kr. Hetta verður gjørt við, at rakstrarútreiðslurnar verða tálmaðar.

250 tús. kr. verða fluttar av høvuðskontu 11.20.3.10 Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarjáttan) til høvuðskontu 11.20.2.05 Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan).

Kommunulæknavaktin hevur ikki virka nøktandi í Norðoyggjum og pørtum av Eysturoynni. Nevndin metir at Klaksvíkar Sjúkrahús eigur at takast meira við í skipanina, soleiðis at mangan óneyðuga og ikki altíð vandaleysa koyringin til Havnar í læknaørindum kann avmarkast. 1,0 mió kr verða nýttar til at styrkja um forvaktina á sjúkrahúsinum.

66 tkr. koma inn sum inntøkufíggjað virksemi.

Fíggjarnevndin heldur, at aftaná: "Kanningin av fíggjarviðurskiftunum í sjúkrahúsverkinum" er gjørd, eiga sjúkrahúsini at fremja eina sparing upp á 10 pct. býtt yvir árini 2010-2012, við 3 pct. 2010 og 2011 og 4 pct. 2012. Landsstýrismaðurin eigur at taka hesa sparing við, tá ið uppskot til fíggjarlóg verður gjørt fyri 2010.

## *11-20.3.11.* Klaksvíkar sjúkrahús

| | Løguj. | *Útt:* | **+ 1.000** |
|---|---|---|---|
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

Játtað verður 1 mió. kr. til framhaldandi høvuðsumvæling av starvsfólkabygninginum. Bygginevnd er sett at fyrireika størri umbyggingar av Klaksvíkar sjúkrahúsi.

**11-20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús** Rakstrarj. *Útt:* + 1.847

*verður flutt frá § 8* *Inn:* -

Fíggjarnevndin heldur, at aftaná: "Kanningin av fíggjarviðurskiftunum í sjúkrahúsverkinum" er gjørd, eiga sjúkrahúsini at fremja eina sparing upp á 10 pct. býtt yvir árini 2010-2012, við 3 pct. 2010 og 2011 og 4 pct. 2012. Landsstýrismaðurin eigur at taka hesa sparing við, tá ið uppskot til fíggjarlóg verður gjørt fyri 2010.

Játtanin verður økt við 1.500 tús. kr. til lønir. Í 2008 varð biðið um eina lægri eykajáttan enn tørvur annars var á, tí 2 yvirlæknastørv vóru ósett. Hesi størvini eru sett á heysti í 2008, og tí má játtanin økjast nú. Heilivágsútreiðslurnar hækka við 500 tús. kr. og aðrar rakstrarframskrivingar hækka við 200 tús. kr.

Fluttar verða 200 tús. kr. av høvuðskontu 11.20.3.15 Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarjáttan) til høvuðskontu 11.20.2.05 Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarjáttan).

**11-20.3.16. Suðuroyar sjúkrahús** Løguj. *Útt:* + 1.500

*verður flutt frá § 8* *Inn:* -

Sjúkrahúsið fór í 2008 undir at nútíðargera starvsfólkabygningin.
Bygningurin, ið er frá fyrst í 50´unum hevur tørv á munandi ábótum, bæði hvat viðvíkur brunakrøvum, nútíðargerð av installatiónum, og eisini verður neyðugt at gera nýggja kloakkskipan.

**11-20.3.20. Serviðgerð uttanlands** Rakstrarj. *Útt:* + 1.720

*verður flutt frá § 8* *Inn:* -

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009 er roknað við 4,9 mió. kr. í vøkstri á kontuni. Við óbroyttum virksemi verður neyðugt við 5,0 mió. kr. afturat í 2009. Heilsumálaráðið hevur ætlanir um at gera broytingar í, hvussu visitasjónin til serviðgerð uttanlands verður skipað. Roknað verður við, at 3,0 mió. kr. kunnu sparast við hesum.

Sjúklingahotellið Tórshavn hevur boðað frá, at játtanin fyri 2009 er ov tepur. Í hesum sambandi hevur sjúklingahotellið m.a. víst á, at talið av gistandi er økt nógv. Tí verða hesar broytingar gjørdar í høvuðskontuni. 1 mió. kr. verða fluttar frá undirkontu 20 Vanligt virksemi til undirkontu 23. Sjúklingahotellið Tórshavn, og at 500 tús. kr. verða fluttar frá undirkontu 22. Flutningur og uppihald til undirkontu 23. Sjúklingahotellið Tórshavn, soleiðis at henda konta verður økt við tilsamans 1,5 mió. kr.

Játtanin verður økt við 2 mió. kr.

Fluttar verða 280 tús. kr. til kontu 11.20.3.04 Landssjúkrahúsið vegna avtalu um barna- og ungdómspsykiati.

**12-11.1.25. Almannamálaráðið** *Útt:* + 10.617

*Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,4 mió. kr. ov høg.

Verandi samgonga hevur avgjørt, at tveir landsstýrismenn skulu umsita ávikavist almannamál og heilsumál. Í hesum sambandi verður Almanna- og heilsumálaráðið býtt sundur í tvey ráð, Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið. Høvuðskonta 11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið er niðurløgd, og játtanin er flutt til høvuðskonturnar 11.1.24. Heilsumálaráðið og 11.1.26. Almannamálaráðið.

21. Ráð og nevndir
Høvuðskonta 11.1.08 Almanna- og heilsumálaráðið, undirkonta 22. Ráð og nevndir er niðurløgd og játtanin er býtt ímillum §11 og §12.
Játtanin, sum er avsett til Almannamálaráðið, skal brúkast til Ráðið fyri brekað og til virksemi fyri nýtt ráð, Barnaráðið, sum eftir ætlan fer at virka frá seinnu helvt av 2009.

24. SSP-samstarv
Fluttar eru 250 tús.kr. frá høvuðskontu 20.1.04. Upplýsing og ráðgeving, undirkontu 27. SSP-samstarv, tí økið er flutt frá landsstýrismanninum í heilsumálum til landsstýriskvinnuna í almannamálum. Harumframt verður biðið um, at 150 tkr. verða fluttar frá høvuðskontu 21.3.18. Ráðgevandi toymi, soleiðis at samlaða játtanin til SSP-samstarv verður 400 tús.kr.

Landsstýriskvinnan í almannamálum umsitur almannamál og íbúðarmál. Ráðið, sum umsitur økið, er Almannamálaráðið.

Uppgávan hjá Almannamálaráðnum er:
- at ráðgeva landsstýriskvinnunni í almannamálum og íbúðarmálum
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið halda til í sama bygningi. Á henda hátt kann samstarv verða um partar av virkseminum. Almannamálaráðið hevur saman við Heilsumálaráðnum m.a. felags HR-deild og tænastueind.

Felagseindirnar eru býttar millum ráðini soleiðis, at øll starvsfólk hava eina greiða tilvísing, og er munurin á útreiðslunum til felagseindirnar útjavnaður í innanhýsis flyting millum ráðini. Játtanin til lønir og beinleiðis starvsfólkaútreiðslur er býtt eftir talinum av starvsfólkum. Játtanin til aðrar rakstrarútreiðslur er javnt býtt ímillum ráðini.

Játtanin til ráðið er hækkað við 1.500 tús.kr. vegna setan av aðalstjóra, skrivara til landsstýriskvinnu og øktar rakstrarútreiðslur.

### *12-11.1.37.* Viðlíkahald

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rakstrarj. | ***Útt:*** | **+ 3.422** |
| | ***Inn:*** | **-** |

Høvuðskonta 11.1.18. Viðlíkahald er niðurløgd, og játtanin er býtt ímillum høvuðskonturnar 11.11.1.32. Viðlíkahald og 12.11.1.37. Viðlíkahald. Játtanin skal nýtast til stovnar á almannaøkinum.

### *12-21.1.04.* Almannastovan

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | ***Útt:*** | **- 2.883** |
| | ***Inn:*** | **-** |

*verður flutt frá § 8*

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 2,883 mió. kr. ov høg.

### 12-21.1.09. Alv-skúlin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Løguj. | *Útt:* | + 500 | |
| | *Inn:* | - | |

Atkomuviðurskiftini á Alv-skúlanum skulu broytast soleiðis, at fólk við rørslutarni betri kunnu fáa atgongd til skúlan. Neyðugt verður í hesum sambandi at gera eina tilbygging til verandi inngongd, sum er ov trong. Samstundis verður gjørd ein uppihaldsstova og eitt wc.

### 12-21.1.10. Teknmálstulkatænastan

*verður flutt frá § 8*

| | |
|---|---|
| *Útt:* | + 150 |
| *Inn:* | - |

Orsakað av vaksandi tørvi á tulkum, verður neyðugt at hækka játtanina til setan av einum tulki afturat. Útbúgvingartilboðini og frítíðartilboð til deyv eru vorðin fleiri. Í Føroyum eru so at siga øll deyv í arbeiðsførum aldri í lønandi arbeiði, og møguleikin fyri tulkatænastu er avgerandi fyri, at deyv kunnu varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

### 12-21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

*verður flutt frá § 8*

| | |
|---|---|
| *Útt:* | + 90 |
| *Inn:* | - |

Játtanin er hækkað vegna sáttmálabundnar lønarhækkingar í Danmark.

### 12-21.1.25. Studningur annars

*verður flutt frá § 8*

| | |
|---|---|
| *Útt:* | - 200 |
| *Inn:* | - |

Fíggjarnevndin heldur tað ikki verða rætt at játta pengar til hetta endamál longur.

### 12-21.3.01. Barnavernd

*verður flutt frá § 8*

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - 600 |
| | *Inn:* | + 600 |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 600 tkr. ov høg.

Sambært kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur og kunngerð nr. 4 frá 30. januar 2007 um brúkaragjøld fyri børn á stovni hjá landinum, skulu kommunurnar rinda ein part av útreiðslunum vegna stovnsuppihald. Almannastovan metir, at kommunurnar fara at rinda 600 tkr. í 2009.

### 12-21.3.05. Stuðul til uppihaldspening

*verður flutt frá § 8*

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - 129 |
| | *Inn:* | - |

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt, soleiðis at árliga javningin er lækkað úr 4% í 3%.

### 12-21.3.06. Barnaískoyti

*verður flutt frá § 8*

| | | |
|---|---|---|
| Lógarbundin | *Útt:* | - 2.187 |
| | *Inn:* | - |

Útreiðslurnar til nýggja barnaískoytið til stakar uppihaldarar vórðu upprunaliga mettar at verða 8,1 mió.kr. í 2009. Færri umsóknir eru móttiknar í árinum 2008, enn roknað var við

frammanundan, og kann játtanin tí lækka.

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt, soleiðis at árliga javningin er lækkað úr 4% í 3%.

**12-21.3.08. Børn og ung** Rakstrarj. **Útt: - 5.277**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 5,277 mió. kr. ov høg.

**12-21.3.12. Barnatænastan** Rakstrarj. **Útt: - 200**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 200 tkr. ov høg.

**12-21.3.18. Ráðgevandi toymi** Rakstrarj. **Útt: - 210**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 60 tkr. ov høg.

150 tús.kr. verða fluttar av høvuðskontu 21.3.18. Ráðgevandi toymi til høvuðskontu 11.1.26. Almannamálaráðið, undirkontu 24. SSP-samstarv.

**12-21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum** **Útt: - 6.110**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Fíggjarnevndin heldur tað ikki verða rætt at játta meira enn 6 mió. kr. til stuðul til ein felagsskap sum 'stuðulsjáttan', hetta eigur at verða veitt sum 'rakstrarjáttan'. Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt vart við hesi viðurskifti.

Fíggjarnevndin heldur tað tí verða betur at flyta upphæddina til konto 21.6.19 ALV , ið er ein rakstrarjáttan.

**12-21.6.01. Serforsorg** Rakstrarj. **Útt: - 3.019**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 3,019 mió. kr. ov høg.

Nýggjur trukkur verður útvegaður til Verkstaðin á Brekku í Klaksvík.

**12-21.6.02. Bústovnar o.a.** Løguj. **Útt: -**
*verður flutt frá § 8* **Inn: -**

Játtanin skal eisini nýtast til umbygging av hølum til autistar í Klaksvík og til fyrireiking av tveimum verkætlanum til børn og ung.

**12-21.6.04. Eldrarøkt** Rakstrarj. *Útt:* **- 185**
*verður flutt frá § 8* *Inn:* **-**

Sum liður í útbyggingini av Landssjúkrahúsinum varð í 2006 gjørt av, at røktardeildin (E2) skuldi niðurleggjast frá 1. januar 2009 og búfólkini flyta til aðrar stovnar undir Heimatænastuni.

Játtanin til innanhýsis flytingar millum almennar stovnar, er tí lækkað, og er flutt til virksemi niðanfyri:
Til undirkontu 25. Heimatænastan, verða 2.746 tús.kr. fluttar. Upphæddin skal nýtast til náttarvaktir og nýggjar brúkarar.
Til undirkontu 27. Økisterapi, verða 500 tús.kr. fluttar, sum skulu nýtast til setan av einum økisterapeuti.
Til høvuðskontu 8.21.6.08. Nærverkið, Meginskrivstovan, verða fluttar 500 tús.kr., sum skulu nýtast til at fara undir fyrireiking av endurvenjingartænastuni fyri vaksin innan alt almannaøkið.
Til høvuðskontu 12.21.6.01. Serforsorg, verða 732 tús.kr. fluttar, sum m.a. skulu nýtast til brúkarar, sum eru vorðnir alsamt eldri og tyngri.

**12-21.6.10. Ansingarsamsýning** Lógarbundin *Útt:* **- 222**
*verður flutt frá § 8* *Inn:* **-**

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt, soleiðis at árliga javningin er lækkað úr 4% niður í 3%.

**12-21.6.11. Stuðulstænastan** Rakstrarj. *Útt:* **- 1.679**
*verður flutt frá § 8* *Inn:* **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,679 mió. kr. ov høg.

**12-21.6.16. Eldrasambýli** Løguj. *Útt:* **- 1.400**
*verður flutt frá § 8* *Inn:* **-**

Nýggjar metingar vísa, at tørvur er á 14.800 tús.kr. í 2009. Játtanin er javnað samsvarandi hesum.

**12-21.6.19. Endurbúgvingarstovnurin ALV** Rakstrarj. *Útt:* **+ 6.110**
*verður flutt frá § 0* *Inn:* **-**

Játtanin er flutt frá einari stuðulsjáttan til eina rakstarjáttan.

**12-21.6.20. Føroya blindastovnur** Rakstrarj. *Útt:* **- 500**
*verður flutt frá § 8* *Inn:* **-**

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er ½ mió. kr. ov høg.

**12-21.7.01. Vanlig forsorg** Lógarbundin *Útt:* **- 12.648**

*verður flutt frá § 8* **Inn:** -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 12,648 mió. kr. ov høg.

Nýggjar metingar frá Almannastovuni vísa, at útreiðslurnar til hjálp til viðgerð á serligum stovnum verða 1.700 tús. kr. hægri, enn mett varð, tá fíggjarlógaruppskotið varð gjørt.

Sambært nýggjari kunngerð um hoyritól, við gildiskomu 1. januar 2009, verður nýggj tilskotsskipan sett í verk, soleiðis at til ber hjá persónum, ið eru 18 ár og eldri, at fáa tilskot til keyp av hoyritóli frá góðkendum privatum veitara. Samstundis verður raksturin av hoyritólaklinikkini settur undir vanliga virksemið hjá Landssjúkrahúsinum, og inntøkufíggjaða virksemið verður niðurlagt. Fluttar verða 1.496 tús. kr. frá høvuðskontu 8.21.7.01. Vanlig forsorg fyri rakstur av Hoyritólaklinikkini frá 1. januar 2009 til høvuðskontu 8.20.3.04. Landsssjúkrahúsið. Undirkonta 09 Hoyritól fevnir soleiðis bert um keyp av hoyritólum og tilskot til keyp av hoyritólum. Við hesi broyting verður roknað við eini sparing á 1.000 tús. kr.

Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at hækka egingjaldið á heilivági. Mett verður, at spardar verða 549 tús. kr. á forsorgarøkinum, um hetta verður sett í verk.

Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at gera kunngerðir á øðrum økjum innan hjálparamboð, sum fara at minka um vøksturin í útreiðslunum til hjálparamboð. Í mun til fíggjarlógaruppskotið fyri 2009 er metingin lækkað við 1.500 tús.kr.

## *15-11.1.23.* Landsins ognir

Rakstrarj. **Útt:** -

*verður flutt frá § 6* **Inn:** **+ 1.200**

Oljutangarnir eru ikki seldir og verða tað neyvan, tí má inntøka fyri leigu setast á sum inntøka.

## *15-11.1.39.* Innlendismálaráðið

Rakstrarj. **Útt:** **- 1.231**

*verður flutt frá § 14* **Inn:** -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1,231 mió. kr. ov høg.

Arbeiðið at endurskoða Happadráttin verður liðugt í ár. Játtanin, sum er til endurskoðan av happadráttinum, upp á 100 tús. kr., verður tí strikað. Játtanin á 250 tús. kr. til suðuroyarætlanina verður strikað. Útlendingastovan hevur boðað frá, at hon kann spara 25 tús. kr. í rakstrinum í 2009. Játtanin á 156 tús. kr. til Arbeiðsmarknaðarráðið, ið ongantíð hevur verið virkið, verður strikað.

Landsstýrið hevur, sum avtalað í samgonguskjalinum, gjørt av at seta eina nevnd, sum skal gera uppskot til kommunureform. Ætlanin er at nevndin skal verða liðug við arbeiði á ólavsøku 2009.

Nakrir av limunum í nevndini eru uttanhýsis serfrøðingar, sum verða løntir sambært avtalu. Kostnaðurin av arbeiðinum verður mettur til 500 tús. kr.

Í sambandi við veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í 2009 ætlar landsstýrið at seta

verðurlagsmálið á dagsskrá m.a. við at stuðla verkætlanum við til samans 500 tús. kr.

Skálafjarðartunnilin
Ætlanin er, sum ásett í samgonguskjalinum, at fara í samráðingar við felag um treytir o.a. í sambandi við at gera og reka tunnil undir skálafjørðinum. Í hesum sambandi er neyðugt við løgfrøðiligari, fíggjarligari og aðrari ráðgeving. Ætlandi skal felagið, sum avtala verður gjørd við, rinda allan kostnað, sum tað almenna hevur í sambandi við samráðingarnar.

**15-14.1.04. Føroya kærustovnur** Rakstrarj. *Útt:* - 650
*verður flutt frá § 14* *Inn:* -

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 650 tkr. ov høg.

**15-37.4.02. Umhvørvisstovan** Rakstrarj. *Útt:* - 5.623
*verður flutt frá § 14* *Inn:* -

Orkuráð verður skipað til tess at ráðgeva og upplýsa borgarnar og vinnu um orkusparandi og umhvørvisvinnaliga bygging. Krøv verða sett til bjálving og virkað verðu fyri, at vinna bæði á sjógvi og landi fylgir altjóða mátum fyri orkunýtslu.

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 870 tkr. ov høg.

Ætlanin er at broyta umhvørvisgjøld og gjøld fyri martikulering. Ætlandi verður meirinntøkan av hesum 1,5 mió. kr.

Føroya náttúrugripasavn verður skilt út á egna høvuðskontu 7.24.3.13. Føroya náttúrugripasavn (Rakstrarjáttan) við 3.253 tús. kr. á § 7.

**15-37.4.05. Umhvørvisstovan** Løguj. *Útt:* + 1.500
*verður flutt frá § 14* *Inn:* -

Umvælingarnar av Umhvørvisstovuni, ið verða lidnar í 2009, verða mettar at kosta 1,5 mió.

**15-37.4.07. Orkumál** *Útt:* + 5.000
*Inn:* -

Endamál við hesi játtan er at stuðla verkætlanum til alternativa orku, so sum verkætlanir hjá sp/f RHESA og Sewave.

**15-37.4.27. Orkunýtsla í almennum bygningum** Løguj. *Útt:* + 15.000
*Inn:* -

Játtanin skal nýtast til at byrja eitt miðvíst arbeiði fyri at minka um orkunýtsluna í almennum bygningum. Játtanin kann nýtast bæði til bjálving og til at fáa upphiting úr alternativum orkukeldum. Ætlanin er, at játtanin á hesi kontu skal vaksa munandi komandi árini.

**15-38.1.02. Landsverk** Rakstrarj. *Útt:* - 3.746

*verður flutt frá § 6* **Inn:** -

Landsverk hevur spart 3% av rakstrinum á øllum rakstrarkontum, tó undantikið inntøkufíggjaðum
virksemi, sum skal hvíla í sær sjálvum. Í sambandi við, at aliloyvi verða løgd
til Skráseting Føroya at umsita, verða 320 tús. kr. fluttar av undirkontu 35. Havnir.

**15-38.1.07. Nýggir landsvegir** Løguj. **Útt:** **+ 38.600**

*verður flutt frá § 6* **Inn:** -

Verkætlanir sum verða játta eru:

| | mió. kr |
|---|---|
| Øravík- Hov | 2.6 |
| Dagføring av brúm og tunnlum | 4.1 |
| Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka | 6.0 |
| Vegagerð í Leirvík | 20 |
| Vegagerð í Kalsoy, vegir, tunnlar og havnir | 2.5 |
| Hvalbiartunnilin | 3 |
| Brúgvin um Streymin | 5 |
| Leynatunnilin | 5.3 |
| Norð um Fjall (byrging um Haraldsund) | 22 |
| Skálavík, brimverja | 1 |
| Havnin í Skúvoy | 7.0 |
| Vegurin omanfyri Skálafjørð | 10 |
| Vegurin omanfyri Rúnavík | 2,0 |
| Rituvíkarvegurin | 2,0 |
| | 92.5 |

Øravík – Hov
Játtanin er til liðugtgerð av projektinum umframt annan kostnað.

Dagføring av brúm og tunnlum
Hildið verður fram við dagføring av tunnlum og brúm

Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka
Fyri at bøta um ferðslutrygdina á landsvegunum, verður peningur játtaður til trygdartiltøk, størri ábøtur o.a.

Vegagerð í Leirvík
Farið verður undir at gera nýggju vegaføringina ígjøgnum Leirvík samsvarandi løgtingslóg.

Vega- og havnagerð í Kalsoynni
Játtanin skal nýtast til framhaldandi arbeiðið at gera lidnar vegir og tunnlar í oynni, umframt at bøta um samferðsluhavnina á Syðradali, har pierur at halda ferjuni við skal gerast sunnanvert atløgurampuna. Hetta fer at bøta mugnandi um møguleikarnar hjá ferjuni at lenda í ringum líkindum.

Hvalbiartunnilin
Farið verður undir fyrireikingar at gera nýggjan Hvalbiartunnil

Brúgvin um Streymin
Brúgvin um Streymin verður umvæld sambært ætlan

Leynatunnilin
Leynatunnilin verður umvældur sambært ætlan, og játtanin røkkur til at gera umvælingina lidna.

Norð um Fjall
Farið verður undir at gera tunnil Norð um Fjall, samstundis sum farið verður undir at gera byrgingina um Haraldsund lidna.

Skálavík, brimverja
Peningurin er játtaður til at bøta um brimverjuna í Skálavík.

Havnin í Skúoy
Gerast skal nýggj havn í Skúvoy. Umframt hesa játtan er møguligt at fíggja partar av verkætlanini við kontuni "Stuðul til infrakervið á útoyggj."

Vegurin omanfyri Skálafjørð
10 mió kr verða játtaðar til endamálið.

Vegurin omanfyri Runavík
Peningurin skal nýtast til fyrireikingar í samband við, at nýggjur ringvegur skal gerast omanfyri bygdirnar Runavík, Saltangará og Glyvrar.

Rituvíkarvegurin
Hildið verður fram við at gera nýggjan veg til Rituvíkar.

### *15-38.1.18.* Stuðul til infrakervið á útoyggjum

| | | |
|---|---|---|
| | *Útt:* | - |
| *verður flutt frá § 6* | *Inn:* | - |

Stuðulin kann eisini veitast til vinnuátøk á útoyggj av hesi konto

### *16-13.2.01.* Norðurlandasamstarv, ráðharraráð

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | *Útt:* | - 1.000 |
| | *Inn:* | - |

Játtanin fíggjar endurgjald fyri uttanlandsferðir í sambandi við fundarvirksemi í Norðurlanda Ráðharraráðnum. Endurgjaldið verður veitt sambært semju millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins um endurgjald fyri ferðir uttanlands. Norðurlanda Ráðharraráðið hevur seinastu árini latið hálva millión krónur til endamálið, sum hava verið játtaðar á standardkontu 64. Hesin stuðul fellur burtur í 2009. Somuleiðis fellur játtanin á hesi kontu burtur, og verða stjórnarráðini framyvir sjálvi at rinda fyri luttøku.

### *16-13.4.01.* Kappingarsamleiki

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarj. | *Útt:* | - 750 |
| | *Inn:* | - |

Virksemið á hesi kontu er natúrligur partur av virkseminum hjá Uttanríkisráðnum, og tí verður henda høvuðskonta niðurløgd og játtanin flutt til 16.11.1.54. Uttanríkistænastan.

**20-50.1.01. Rentur at gjalda** *Útt:* + 10.000
*Inn:* -

Dagførd meting pr. 1. desember er, at rentuútreiðslurnar av landsins skuld verða 118 mió. kr. í 2009, sum eru 10 mió. kr. meira enn í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009.

**20-50.2.07. Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya** *Útt:* -
*Inn:* - 6.100

Dagførd meting pr. 1. desember er, at yvirskotið frá Landsbankanum verður 12,8 mió. kr. í 2009, sum er 6,1 mió. kr. minni enn í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009.

**20-52.1.01. Vanligur landsskattur** *Útt:* -
*Inn:* - 73.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at inntøkurnar av vanligum landsskatti verða 1.370 mió. kr. í 2008, sum eru 50 mió. kr. minni enn játtanin á fíggjarlógini. Inntøkurnar fyri 2009 verða nú mettar til 1.405 mió. kr., sum eru 73 mió. kr. minni enn mett í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009. Broytingin í skattainntøkunum í 2009 er grundað á skattahækking á +36 mió. kr., regulering av FAS-endurgjaldinum +15 mió. kr., sáttmálahækkingar á 3% +43 mió. kr. og mettur virknaður av minkandi virksemi og av tí at lønarlagið í samfelagnum nú glíður niður ímóti sáttmálalønunum á -4%, t.e. -59 mió. kr.

**20-52.1.28. Gjald til barsilsskipan** *Útt:* -
*Inn:* - 3.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at inntøkurnar frá gjaldi til barsilsskipan verða 90 mió. kr. í 2008, sum eru 3 mió. kr. minni enn játtanin á fíggjarlógini. Inntøkurnar fyri 2009 verða nú mettar til 90 mió. kr., sum eru 3 mió. kr. minni enn mett í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009.

**20-52.2.01. Meirvirðisgjald** *Útt:* -
*Inn:* - 125.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at inntøkurnar av meirvirðisgjaldi verða 1.300 mió. kr. í 2008, sum eru 75 mió. kr. minni enn játtanin á fíggjarlógini. Inntøkurnar fyri 2009 verða nú mettar til 1.200 mió. kr., sum eru 125 mió. kr. minni enn mett í uppskotinum til fíggjarlóg 2009.

**20-52.2.07. Punktgjøld** *Útt:* -
*Inn:* - 25.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at inntøkurnar av punktgjøldum verða 180 mió. kr. í 2008, sum eru 25 mió. kr. minni enn játtanin á fíggjarlógini. Inntøkurnar fyri 2009 verða nú mettar til 180 mió. kr., sum eru 25 mió. kr. minni enn mett í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009.

**20-52.2.19. Skrásetingargjald** *Útt:* -
*Inn:* - 30.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at inntøkurnar av skrásetingargjaldi verða 100 mió. kr. í 2008, sum eru 20 mió. kr. minni enn játtanin á fíggjarlógini. Inntøkurnar fyri 2009 verða nú mettar til 60 mió. kr., sum eru 30 mió. kr. minni enn mett í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2009.

**20-52.3.01. Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992** *Útt:* - *Inn:* - 10.000

Dagførd meting pr. 1. desember er, at útlutingin úr Fíggingargrunninum verður 15 mió. kr. í 2008, sum er tað sum er játta á fíggjarlógini. Tað verður ikki roknað við útluting í 2009, eftirsum figgjarligi hjálparpakkin treytaði, at peningastovnar ikki luta út vinningsbýti fyri roknskaparárini 2008 og 2009.

**20-52.3.10. Aðrar inntøkur** *Útt:* - *Inn:* + 390

Økt gjøld.

Samsvarandi hesum viðmerkingum setir ein samd Fíggjarnevnd fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 1. Løgtingið

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.395 | -2.395 | - |
| Løgu ætlan | -1.250 | -1.250 | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 10.1.02. Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn (Lógarbundin j.) | U: | 4.844 | - |
| | **BU:** | **-400** | **-** |
| 10.1.03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarj.) | U: | 31.136 | - |
| | **BU:** | **-395** | **-** |
| 10.1.10. Nýggjur bygningur til Føroya Løgting (Løguj.) | U: | 1.500 | - |
| | **BU:** | **-1.250** | **-** |
| 10.2.01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarj.) | U: | 6.558 | - |
| | **BU:** | **-1.080** | **-** |
| 10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarj.) | U: | 3.400 | - |
| | **BU:** | **-520** | **-** |

# § 2. Løgmansfyrisitingin

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 310 | 310 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | U: | 8.447 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarj.) | U: | 5.820 | - |
| | **BU:** | **810** | **-** |

# § 3. Fíggjarmál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -3.770 | -3.770 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 8.567 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.) | U: | 720 | - |
| | **BU:** | **-320** | **-** |
| 15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarj.) | U: | 24.811 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarj.) | U: | 782 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarj.) | U: | 10.076 | - |
| | **BU:** | **-450** | **-** |
| 21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin j.) | U: | 17.000 | - |
| | **BU:** | **-2.500** | **-** |
| 22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin j.) | U: | 160.000 | 52.000 |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 22.4.04. Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | U: | 15.000 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |

# § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -23.370 | -19.620 | 3.750 |
| Løgu ætlan | -14.200 | -14.200 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 19.576 | - |
| | **BU:** | **-5.443** | **-** |
| 11.1.34. Granskingarætlanir (Rakstrarj.) | U: | 4.834 | - |
| | **BU:** | **-1.200** | **-** |
| 31.1.07. Veðurtænastan (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **3.750** |
| 32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarj.) | U: | 19.403 | - |
| *verður flutt til § 6* | **BU:** | **-2.000** | **-** |
| 33.2.11. Almenn jørð, søla (Løguj.) | U: | 25.000 | 25.000 |
| | **BU:** | **-15.000** | **-** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 34.2.01. | Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 47.040 | - |
| | | **BU:** | **-3.577** | **-** |
| 34.3.06. | Nýtt havrannsóknarskip (Løguj.) | U: | - | - |
| | | **BU:** | **800** | **-** |
| 34.4.01. | Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin j.) | U: | 28.000 | - |
| | | **BU:** | **-4.000** | **-** |
| 34.4.04. | Sjúkratrygd (Lógarbundin j.) | U: | 7.000 | - |
| | | **BU:** | **-1.500** | **-** |
| 34.4.22. | Flutningsstuðul (Lógarbundin j.) | U: | 4.700 | - |
| | | **BU:** | **-1.500** | **-** |
| 35.1.01. | Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (Rakstrarj.) | U: | 295 | - |
| | *verður flutt til § 6* | **BU:** | **300** | **-** |
| 35.1.02. | Skipaeftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 8.599 | - |
| | *verður flutt til § 6* | **BU:** | **-700** | **-** |
| 35.1.03. | Trygdarmiðstøðin (Rakstrarj.) | U: | 2.640 | - |
| | | **BU:** | **-** | **-** |

# § 6. Vinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -12.006 | -10.806 | 1.200 |
| Løgu ætlan | 35.500 | 39.000 | 3.500 |

| | | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.06. | Vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 10.935 | - |
| | | **BU:** | **-1.750** | **-** |
| 11.1.16. | Viðlíkahald (Rakstrarj.) | U: | 400 | - |
| | | **BU:** | **-200** | **-** |
| 11.1.23. | Landsins ognir (Rakstrarj.) | U: | -375 | - |
| | *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-** | **1.200** |
| 21.1.13. | Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarj.) | U: | 378 | - |
| | | **BU:** | **-378** | **-** |
| 32.1.09. | SeWave | U: | 300 | - |
| | | **BU:** | **-300** | **-** |
| 33.1.04. | Djóralæknatænastur (Rakstrarj.) | U: | 900 | - |
| | | **BU:** | **200** | **-** |
| 36.1.07. | Fiskasjúkutænastur (Rakstrarj.) | U: | 5.416 | - |
| | | **BU:** | **-1.399** | **-** |
| 37.1.08. | Loyvisnevndin (Rakstrarj.) | U: | 150 | - |
| | | **BU:** | **-50** | **-** |
| 37.1.10. | El-nevndin (Rakstrarj.) | U: | 240 | - |
| | | **BU:** | **-50** | **-** |
| 37.1.15. | Brúkaraumboð (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | | **BU:** | **1.200** | **-** |
| 37.1.17. | Kappingarráðið (Rakstrarj.) | U: | 2.490 | - |
| | | **BU:** | **-782** | **-** |
| 37.1.18. | Skráseting Føroya (Rakstrarj.) | U: | 1.023 | - |
| | | **BU:** | **174** | **-** |
| 37.5.04. | Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarj.) | U: | 18.046 | - |
| | | **BU:** | **-1.200** | **-** |
| 38.1.02. | Landsverk (Rakstrarj.) | U: | 72.164 | - |
| | *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-3.746** | **-** |
| 38.1.07. | Nýggir landsvegir (Løguj.) | U: | 53.900 | 100 |
| | *verður flutt til § 15* | **BU:** | **38.600** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum | U: | 3.100 | - |
| *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-** | **-** |
| 38.2.03. Strandfaraskip landsins (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **3.500** | **-** |
| 38.2.09. Vága floghavn (Løguj.) | U: | 4.600 | - |
| | **BU:** | **-1.100** | **3.500** |
| 38.2.13. Flogferðsla (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **-2.000** | **-** |
| 38.2.23. Sandoyartunnil (Løguj.) | U: | 2.000 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 39.1.01. Semingsmannaskipanin (Rakstrarj.) | U: | 300 | - |
| | **BU:** | **-100** | **-** |
| 39.1.02. Fastur gerðarættur | U: | 1.100 | - |
| | **BU:** | **-100** | **-** |
| 39.1.07. Arbeiðseftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 5.356 | - |
| | **BU:** | **-1.875** | **-** |
| 39.4.04. Umsiting av barsilsskipan (Rakstrarj.) | U: | 2.036 | - |
| | **BU:** | **-450** | **-** |

# C. Átekningar

**Nr. 2** 38.1.07 Nýggir landsvegir

Verkætlanir sum verða játta eru:

| | | mió. kr |
|---|---|---|
| Øravík- Hov | 2.6 | |
| Dagføring av brúm og tunnlum | 4.1 | |
| Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka | 6.0 | |
| Vegagerð í Leirvík | | 20 |
| Vegagerð í Kalsoy, vegir, tunnlar og havnir | 2.5 | |
| Hvalbiartunnilin | 3 | |
| Brúgvin um Streymin | | 5 |
| Leynatunnilin | 5.3 | |
| Norð um Fjall (byrging um Haraldsund) | 22 | |
| Skálavík, brimverja | | 1 |
| Havnin í Skúvoy | 7.0 | |
| Vegurin omanfyri Skálafjørð | 10 | |
| Vegurin omanfyri Rúnavík | 2,0 | |
| Rituvíkarvegurin | 2,0 | |
| | | 92.5 |

Øravík – Hov
Játtanin er til liðugtgerð av projektinum umframt annan kostnað.

Dagføring av brúm og tunnlum
Hildið verður fram við dagføring av tunnlum og brúm

Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka
Fyri at bøta um ferðslutrygdina á landsvegunum, verður peningur játtaður til trygdartiltøk, størri ábøtur o.a.

Vegagerð í Leirvík
Farið verður undir at gera nýggju vegaføringina ígjøgnum Leirvík samsvarandi løgtingslóg.

Vega- og havnagerð í Kalsoynni
Játtanin skal nýtast til framhaldandi arbeiðið at gera lidnar vegir og tunnlar í oynni, umframt at bøta um samferðsluhavnina á Syðradali, har pierur at halda ferjuni við skal gerast sunnanvert atløgurampuna. Hetta fer at bøta mugnandi um møguleikarnar hjá ferjuni at lenda í ringum líkindum.

Hvalbiartunnilin
Farið verður undir fyrireikingar at gera nýggjan Hvalbiartunnil

Brúgvin um Streymin
Brúgvin um Streymin verður umvæld sambært ætlan

Leynatunnilin
Leynatunnilin verður umvældur sambært ætlan, og játtanin røkkur til at gera umvælingina lidna.

Norð um Fjall
Farið verður undir at gera tunnil Norð um Fjall, samstundis sum farið verður undir at gera byrgingina um Haraldsund lidna.

Skálavík, brimverja
Peningurin er játtaður til at bøta um brimverjuna í Skálavík.

Havnin í Skúoy
Gerast skal nýggj havn í Skúvoy. Umframt hesa játtan er møguligt at fíggja partar av verkætlanini við kontuni "Stuðul til infrakervið á útoyggj."

Vegurin omanfyri Skálafjørð
10 mió kr verða játtaðar til endamálið.

Vegurin omanfyri Runavík
Peningurin skal nýtast til fyrireikingar í samband við, at nýggjur ringvegur skal gerast omanfyri bygdirnar Runavík, Saltangará og Glyvrar.

Rituvíkarvegurin
Hildið verður fram við at gera nýggjan veg til Rituvíkar.

# § 7. Mentamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -22.479 | -22.479 | - |
| Løgu ætlan | -1.600 | -1.600 | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 11.1.09. Mentamálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 17.371 | - |
| | **BU:** | **-740** | **-** |
| 23.1.10. Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð (Rakstrarj.) | U: | 5.335 | - |
| | **BU:** | **-640** | **-** |
| 23.1.12. KT í skúlaverkinum (Rakstrarj.) | U: | 2.976 | - |
| | **BU:** | **-680** | **-** |
| 23.1.16. Skúlabókagrunnurin (Rakstrarj.) | U: | 7.039 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 23.1.31. Próvtøkur (Rakstrarj.) | U: | 6.938 | - |
| | **BU:** | **-330** | **-** |
| 23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (Rakstrarj.) | U: | 559 | - |
| | **BU:** | **-200** | **-** |
| 23.2.01. Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | U: | 275.918 | - |
| | **BU:** | **-5.000** | **-** |
| 23.2.02. Sernámsdepilin (Rakstrarj.) | U: | 59.381 | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |
| 23.2.06. Skúlatilboð til ung við breki (Rakstrarj.) | U: | 2.450 | - |
| | **BU:** | **-300** | **-** |
| 23.2.08. Eftirskúlar (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.) | U: | 169.306 | - |
| | **BU:** | **-7.195** | **-** |
| 23.3.06. Skúladepil í Suðuroy (Løguj.) | U: | 1.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 23.3.07. Tekniski skúli í Klaksvík (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 23.3.08. Fiskivinnuskúlin (Løguj.) | U: | 600 | - |
| | **BU:** | **-600** | **-** |
| 23.3.09. Skúladepil í Marknagili (Løguj.) | U: | 20.000 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **BU:** | **-8.000** | **-** |
| 23.5.07. Frítíðarundirvísing (Rakstrarj.) | U: | 6.519 | - |
| | **BU:** | **-300** | **-** |
| 23.5.12. Stuðul til lesi og skrivi veik | U: | - | - |
| | **BU:** | **600** | **-** |
| 23.6.03. Klaksvíkar sjómansskúli (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 23.6.04. Klaksvíkar sjómansskúli (Rakstrarj.) | U: | 3.103 | - |
| | **BU:** | **300** | **-** |
| 23.6.05. Vinnuháskúlin (Rakstrarj.) | U: | 20.561 | - |
| | **BU:** | **-2.217** | **-** |
| 23.6.13. Læraraskúlin (Rakstrarj.) | U: | 23.545 | - |
| | **BU:** | **-800** | **-** |
| 23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | U: | 31.342 | - |
| | **BU:** | **-4.038** | **-** |
| 23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarj.) | U: | 2.480 | - |
| | **BU:** | **-530** | **-** |
| 23.6.23. Ymiskar verkætlanir (Rakstrarj.) | U: | 1.262 | - |
| | **BU:** | **-1.262** | **-** |
| 23.7.04. Lestrarstudningur (Lógarbundin j.) | U: | 103.391 | 10.500 |
| | **BU:** | **-3.000** | **-** |
| 24.1.13. Ymiskir studningar | U: | 2.698 | - |
| | **BU:** | **400** | **-** |
| 24.2.01. Tónleikur og sangur | U: | 1.800 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 24.2.04. Mentanargrunnurin | U: | 5.700 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 24.2.08. Týðaragrunnur Landsins | U: | - | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |
| 24.3.13. Føroya náttúrugripasavn (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **3.253** | **-** |
| 24.3.20. Menning av mentan og mentanararvi (Rakstrarj.) | U: | 345 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 24.4.06. Kringvarp Føroya (Landsf.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 24.6.08. Hugasamband Føroya | U: | 450 | - |
| | **BU:** | **200** | **-** |
| 24.6.12. Ítróttaranlegg | U: | 3.000 | - |
| | **BU:** | **-** | **-** |
| 38.3.10. Kringvarpssendistøðir (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **4.000** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 1** C-átekning til ktn 7.24.4.06

Hóast ásetingina í § 9, stk. 4 í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, kann Kringvarpið fáa gjaldføri úr landskassanum at fíggja gjaldførishall í fíggjarárinum. Gjaldførið, sum Kringvarpið fær útvegað úr landskassanum, skal verða afturgoldið í seinasta lagi 31. desember 2009.

Viðmerking: Við ásetingini í § 9, stk. 4 í kringvarpslógini fær Kringvarpið heimild at at flyta eitt møguligt rakstraravlop ella hall til næsta roknskaparár og fær Kringvarpið harvið sítt egna gjaldføri. Tað er tí ivasamt, um Kringvarpið hevur heimild at útvega sær gjaldføri úr landskassanum á sama hátt, sum aðrar landsfyritøkur. C-átekningin hevur til endamál at loysa gjaldføristrupulleikarnar, sum Kringvarpið væntandi kemur í fíggjarárinum 2009.

# § 8. Almanna- og heilsumál o.a.

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -64.768 | -64.168 | 600 |
| Løgu ætlan | 47.600 | 47.600 | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 26.761 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-26.761** | **-** |
| 11.1.18. Viðlíkahald (Rakstrarj.) | U: | 5.574 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-5.574** | **-** |
| 11.1.33. Vísindasiðseminevndin (Rakstrarj.) | U: | 152 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-75** | **-** |
| 20.1.04. Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarj.) | U: | 3.123 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-825** | **-** |
| 20.1.10. Koppsetingar (Lógarbundin j.) | U: | 4.825 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 20.1.19. Læknakanningar av børnum (Lógarbundin j.) | U: | 1.000 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-400** | **-** |
| 20.2.01. Sjúkrakassar | U: | 36.300 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-6.000** | **-** |
| 20.2.05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarj.) | U: | 3.281 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **2.100** | **-** |
| 20.2.09. Apoteksverkið (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **4.000** | **-** |
| 20.3.02. Heilsuverkið (Rakstrarj.) | U: | 2.000 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-2.000** | **-** |
| 20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | U: | 381.517 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **4.775** | **-** |
| 20.3.06. Medicoteknisk tól (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **7.500** | **-** |
| 20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **35.000** | **-** |
| 20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarj.) | U: | 58.680 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.834** | **-** |
| 20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarj.) | U: | 45.092 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.847** | **-** |
| 20.3.16. Suðuroyar sjúkrahús (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.500** | **-** |
| 20.3.20. Serviðgerð uttanlands (Rakstrarj.) | U: | 121.877 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.720** | **-** |
| 21.1.04. Almannastovan (Rakstrarj.) | U: | 41.371 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-2.883** | **-** |
| 21.1.10. Teknmálstulkatænastan | U: | 760 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **150** | **-** |
| 21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark | U: | 958 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **90** | **-** |
| 21.1.25. Studningur annars | U: | 200 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-200** | **-** |
| 21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin j.) | U: | 5.710 | 100 |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-600** | **600** |
| 21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (Lógarbundin j.) | U: | 8.982 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-129** | **-** |
| 21.3.06. Barnaískoyti (Lógarbundin j.) | U: | 8.100 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-2.187** | **-** |
| 21.3.08. Børn og ung (Rakstrarj.) | U: | 44.394 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-5.277** | **-** |
| 21.3.12. Barnatænastan (Rakstrarj.) | U: | 11.343 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-200** | **-** |
| 21.3.18. Ráðgevandi toymi (Rakstrarj.) | U: | 719 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-210** | **-** |
| 21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum | U: | 9.442 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-6.110** | **-** |
| 21.6.01. Serforsorg (Rakstrarj.) | U: | 147.076 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-3.019** | **-** |
| 21.6.02. Bústovnar o.a. (Løguj.) | U: | 26.300 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-** | **-** |
| 21.6.04. Eldrarøkt (Rakstrarj.) | U: | 319.461 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-185** | **-** |
| 21.6.10. Ansingarsamsýning (Lógarbundin j.) | U: | 15.424 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-222** | **-** |
| 21.6.11. Stuðulstænastan (Rakstrarj.) | U: | 23.047 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-1.679** | **-** |
| 21.6.16. Eldrasambýli (Løguj.) | U: | 16.200 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-1.400** | **-** |
| 21.6.20. Føroya blindastovnur (Rakstrarj.) | U: | 6.049 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-500** | **-** |
| 21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin j.) | U: | 167.359 | 4.588 |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-12.648** | **-** |

# § 11. Heilsumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 17.776 | 17.776 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.24. Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **15.624** | **-** |
| 11.1.32. Viðlíkahald (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **2.152** | **-** |

# § 12. Almannamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 20.149 | 20.149 | - |
| Løgu ætlan | 500 | 500 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.25. Almannamálaráðið | U: | - | - |
| | **BU:** | **10.617** | **-** |
| 11.1.37. Viðlíkahald (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **3.422** | **-** |
| 21.1.09. Alv-skúlin (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.6.19. Endurbúgvingarstovnurin ALV (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **6.110** | **-** |

## § 14. Løgmál

| *Játtanar yvirlit* | | | |
|---|---|---|---|
| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| Útreiðsluætlan | -14.804 | -14.804 | - |
| Løgu ætlan | 1.500 | 1.500 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.39. Innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 14.052 | - |
| *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-1.231** | **-** |
| 14.1.04. Føroya kærustovnur (Rakstrarj.) | U: | 5.447 | - |
| *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-650** | **-** |
| 37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarj.) | U: | 24.956 | - |
| *verður flutt til § 15* | **BU:** | **-5.623** | **-** |
| 37.4.05. Umhvørvisstovan (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 15* | **BU:** | **1.500** | **-** |
| 38.2.01. Strandfaraskip landsins (Landsf.) | U: | 125.703 | - |
| *verður flutt til § 6* | **BU:** | **-7.300** | **-** |

## § 15. Innlendismál

| *Játtanar yvirlit* | | | |
|---|---|---|---|
| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| Útreiðsluætlan | 5.000 | 5.000 | - |
| Løgu ætlan | 15.000 | 15.000 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 37.4.07. Orkumál | U: | - | - |
| | **BU:** | **5.000** | **-** |
| 37.4.27. Orkunýtslu í almennum bygningum (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **15.000** | **-** |

## § 16. Uttanríkismál

| *Játtanar yvirlit* | | | |
|---|---|---|---|
| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
| Útreiðsluætlan | -1.750 | -1.750 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 13.2.01. Norðurlandasamstarv, ráðharraráð (Rakstrarj.) | U: | 1.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 13.4.01. Kappingarsamleiki (Rakstrarj.) | U: | 750 | - |
| | **BU:** | **-750** | **-** |

# § 20. Inntøkur

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 281.710 | 10.000 | -271.710 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 50.1.01. Rentur at gjalda | U: | 108.000 | - |
| | **BU:** | **10.000** | **-** |
| 50.2.07. Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | U: | - | 18.900 |
| | **BU:** | **-** | **-6.100** |
| 52.1.01. Vanligur landsskattur | U: | - | 1.478.000 |
| | **BU:** | **-** | **-73.000** |
| 52.1.28. Gjald til barsilsskipan | U: | - | 93.000 |
| | **BU:** | **-** | **-3.000** |
| 52.2.01. Meirvirðisgjald | U: | 110.000 | 1.435.000 |
| | **BU:** | **-** | **-125.000** |
| 52.2.07. Punktgjøld | U: | - | 205.000 |
| | **BU:** | **-** | **-25.000** |
| 52.2.19. Skrásetingargjald | U: | 1.500 | 91.500 |
| | **BU:** | **-** | **-30.000** |
| 52.3.01. Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | U: | - | 10.000 |
| | **BU:** | **-** | **-10.000** |
| 52.3.10. Aðrar inntøkur | U: | - | 10.070 |
| | **BU:** | **-** | **390** |

**Ein meiriluti** (Anfinn Kallsberg, Eyðgunn Samuelsen, Magni Laksáfoss og Bjørn Kalsø) hava harumfram hesar viðmerkingar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***05-34.3.01.* Fiskirannsóknarstovan** | Rakstrarj. | *Útt:* | **- 1.000** |
| | | *Inn:* | **-** |

Framrokningar av mettu nýtsluni í 2008 við eini 3 pct. lønarhækking vísa, at játtanin er 1 mió. kr. ov høg.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***12-21.8.01.* Fólkapensjón** | Lógarbundin | *Útt:* | **- 2.337** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

L.l. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er nú broytt soleiðis, at árliga javningin frá 2008 til 2009 lækkar úr 4% niður í 3%.

Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at hækka egingjaldið á heilivági, og sparingin verður

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***12-21.8.05.* Fyritíðarpensjón** | Lógarbundin | *Útt:* | **- 3.000** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt soleiðis, at árliga javningin er lækkað úr 4% niður í 3%.

Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at hækka egingjaldið á heilivági, og sparingin í mun til FLU 2009 verður mett at verða 544 tús.kr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***12-21.8.08.* Umsorgararbeiði** | | *Útt:* | **- 4.000** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

L.l. nr. 46 frá 9. mai 2005 við seinni broytingum, er nú broytt soleiðis, at stuðulin frá landinum bert fevnur um mattænastu, koyritænastu og vitjanartænastu.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***12-21.8.10.* Einkjubarnastyrkur** | Lógarbundin | *Útt:* | **- 33** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt soleiðis, at árliga javningin er lækkað úr 4% niður í 3%.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***12-21.8.13.* Viðbót til ávísar pensjónistar** | Lógarbundin | *Útt:* | **- 365** |
| *verður flutt frá § 8* | | *Inn:* | **-** |

L.L. nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, er broytt soleiðis, at árliga javningin er lækkað úr 4% niður í 3%.

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***16-11.1.54.* Uttanríkistænastan** | Rakstrarj. | *Útt:* | **+ 1.000** |
| | | *Inn:* | **-** |

Játtanin verður lækkað við 250 tús. kr.

Samgongan vil vita og ikki gita um møguleikarnar fyri tættari sambandi við ES. Tí verður ein skjóttarbeiðandi serfrøðingabólkur settur at greina allar møguleikar fyri tilknýti til ES, harundir eisini, hvørjar treytir eru fyri at gerast partur av ES.

Við støði í frágreiðingini verður viðgjørt politiskt, hvussu víðari verður farið fram.

Ein Evropanevnd verður raðfest og 500 tkr. eru settar av fyri at seta á stovn hesa nevnd.

Høvuðskonta 16.13.4.01. Kappingarsamleiki verður niðurløgd og játtanin flutt á hesa høvuðskontu.

Samsvarandi hesum viðmerkingum setir meirlutin fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -1.000 | -1.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 34.3.01. Fiskirannsóknarstovan (Rakstrarj.) | U: | 12.518 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |

# § 8. Almanna- og heilsumál o.a.

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -9.735 | -9.735 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | U: | 401.899 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-2.337** | **-** |
| 21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | U: | 254.283 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-3.000** | **-** |
| 21.8.08. Umsorgararbeiði | U: | 6.806 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-4.000** | **-** |
| 21.8.10. Einkjubarnastyrkur (Lógarbundin j.) | U: | 2.243 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-33** | **-** |
| 21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin j.) | U: | 25.304 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-365** | **-** |

# § 16. Uttanríkismál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.54. Uttanríkistænastan (Rakstrarj.) | U: | 25.061 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |

**Ein minniluti** (Annita á Fríðriksmørk og Tórbjørn Jacobsen) er sannførdur um, at fíggjar- og búskaparstøðan í landinum, heimsumfatandi kreppan og útlitini í verandi støðu, gera, at politiska skipanin í mest møguligan mun eigur at samstarva eftir besta førimuni, fyri at samfelagið kann verða flutt á skilabesta hátt ígjøgnum eitt væl lægri marknaðarsveip enn tað, sum verið hevur síðani kreppuna fyrst í nítiárunum. Hetta eigur at vera ein partur av tí tilbúgving, ið skal til, um vit skulu gera okkum vónir um at handfara eina møguliga kreppu so skynsamt sum yvirhøvur gjørligt.

Hesar seinastu mánaðirnar er heimssamfelagið farið ígjøgnum eitt rættiligt illveður. Tað, ið byrjaði sum ein kreppa í fíggjargeiranum, er nú í holt við at taka seg upp sum ein umfatandi heimskreppa, har stígur kemur í allar skipanir, m.a. evnini hjá okkara keyparalondum at keypa framleiðsluna í høvuðsvinnuni fyri ein nøktandi prís. Handilin við virðisleysum pappírum, grádigheitin eftir dekningleysum virðum, turkatrúgvin á ein endaleysan búskaparvøkstur í kapitalistiska búskapinum hevur fyribils fingið ein enda, og er um at koma at teimum mørkum, har alt er fullkomin ruðuleiki og bábylonsk ørkemlan. Veiku statsskipanirnar hoyknaðu undir trýstinum frá fíggjargeiranum og dereguleraðu karmarnar samsvarandi aktuella áhuganum, girndini og lobbyini hjá kapitaláhugamálunum, sohvørt sum tumlarnir vóru settir alt longur niður í benið á útinnandi og lóggevandi valdinum. Útlit eru til, at fíggjarkreppan nú gerst ein búskaparkreppa, sum endurskipaðar statsskipanir og skattaborgararnir mega skipa og fíggja. Onki er nýtt undir sólini - søgan endurtekur seg.

Í Føroyum er í fleiri ár rikin ein ábyrgdarleysur fíggjar- og búskaparpolitikkur. Hetta byrjaði í 2004 og helt fram til 2008. Monetaristiski skattapolitikkurin, eftirglóðin frá Reagan og Thatcher, undirmineraði búskapin í landsbúskapinum, sum nú í nógv størri mun varð ávirkaður av nýtsluni hjá fólki. Grundarlagið undir skattaðu inntøkunum fánaði og í alt størri mun varð dúvað á MVG og avgjøld. Nú, táið stígur kemur í búskapin, rapa inntøkurnar, sum væntað. Hetta stendur í mun til alneyðugu vælferðartænasturnar, ið skulu fíggjast á útreiðslusíðuni. Sjálvsagda úrslitið, sum vit hava ávarað um frá byrjan, sum vit hava blást í lúður ímóti, til tess at fáa bara onkran í ABC-samgonguni at skilja álvaran, avleiðingarnar og ræðuleikan av gerðunum, er nú veruleiki og politiskur gerandisdagur. Høgrahalli skattapolitikkurin, rikin undir javnaðarleiðslu, í tiltiknu ABC-samgonguni fyrru, hakaði ongantíð í, sjálvt ikki táið privati fíggjargeirin fór undir at reka ein heilt óvanliga ekspansivan útlánspolitikk. Táið teir pumpaðu so nógv fíggjarfæ út í frívirðini í sethúsamassanum, at mønurnar vóru um at ríva, og handilsjavnin eftirfylgjandi fór í negativt baklás, orsakað av skilaleysari ovurnýtslu í bæði almenna og privata geiranum.

Umframt eina tiltakandi fíggjarkreppu, ið sum sjálvsagda avleiðing, fer at verða elt av eini búskaparkreppu, eru vit eisini hótt av eini umfatandi tilfeingiskreppu, sum fyrst og fremst er íkomin av ongum fiskivinnupolitikki í áravís. Ótálmaðu frumskógarlógirnar hava rátt og ráða við vælsignilsi frá politisku skipanini, og úrslitið er, at høvuðsfiskastovnarnir á heimaleiðum eru í metringum standi. Táið útflutningurin úr høvuðsvinnuni er at kalla einasta mótvekt andvegis neyðuga innflutninginum av brúksvørum, er hetta ein av nógvum javnum, sum er skeiklaður álvarsliga í hesum døgum. Ein annar partur av landsins búskapi eru kommunukassarnir, og har er støðan líka dán, við tað, at høvuðsstaðarkommunan fram ímóti er einasta kommmunan, sum er før fyri at gera nakrar íløgur av týdningi næstu árini.

Niðurstøðan er tí, at støðan er ógvuliga álvarslig. Partvíst av skilaleysari politiskari stýring seinru árini og partvíst av tí heimsumfatandi kreppu, sum í alt størri mun fer at raka Føroyar, tí ongin er vardur í heiminum, táið óløgini koma, soleiðis, sum verðin er samanskrúvað ídag. Støðan kann gerast nakað verri, hinvegin er tó ongin orsøk til at falla í fátt, hóast allir staklutirnir í búskapinum svíkja, tí táið

komið er á botn, er sjálvsagt bara ein vegur, at rógva aftur á aftur. Hann má sjálvandi hava framgongd við sær. Eitt lágt marknaðarsveip fer at merkjast mangastaðni, tí er tað umráðandi, at politiski myndugleikin nú stjórnar landinum soleiðis, at bæði land og fólk koma so heilaskapað burturúr búskaparligu niðurgongdini og møguligu kreppuni sum gjørligt. Støðan hjá teimum almennu Føroyum er ein heilt onnur enn í kreppuárunum í nítiárunum, táið landskassin var niðurbundin, áðrenn kreppan byrjaði. Hinvegin eigur læran at vera, at hesaferð skulu tað ikki bara vera lág- og meðalinntøkurnar sum gjalda gildið, tí eiga tær breiðastu herðarnar, sum í ólukkumát eru lívgaðar við skattavanstýringini hesi seinastu árini, at átaka sær sín lutfalsliga part av tí gongd, sum samfelagið eyðvitað skal ígjøgnum. Hartil eigur strategiski vinnupolitikkurin greitt at miða eftir einum grønum profili, har viðvarandi orka, rationel nýtsla av orkumongd pr. kg. fisk o.s.fr. verður sett í hásætið.

Sitandi landsstýrið, ússaliga endurreisnin av sambandsku og høgravendu ABC-samgonguni, frá 2004-2008, tykist fult og heilt virkislamd. Tykist als ikki at hava skilt álvaran í støðuni og ætlar at stjórna landinum, sum um onki var hent, hagartil fæið í landskassanum er brúkt. Hetta er vandamikil kós, táið allir fíggjarmarknaðir eru læstir. Oddvitar heimastýrisstjórnarinnar, løgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, hava á fundum í Fíggjarnevndini avdúkað, at teir onki sum helst boð hava upp á, hvussu landið skal stjórnast í mun til støðuna í landinum, og ikki minni, í mun til støðuna í alheiminum. Teirra bedrift í fíggjarlógargerðini hevur eittans verið at handa Fíggjarnevndini eina støðugt daprari inntøkumeting um næsta fíggjarár. Sum til endans hevði sníkt seg upp á slakar 600 milliónir krónur í halli, og hartil skal sigast, at teir í alt ov stóran mun høvdu undirmett íløgurnar, fyri at halda eini bráðvakrari fasadu uppi í ljósinum hjá borgarum landsins.

Ýtini hjá Tjóðveldinum eru greið, bæði í bráðfeingis átøkum og í teimum neyðugu bygnaðarbroytingum, ið mega fremjast til tað, at koma sterkari, skjótari og dyggari burturúr teirri fíggjar- og búskaparkreppu og teimum samfelagsbroytingum, sum eru fyri framman. Sosialpolitiskt skulu politisku avgerðirnar í krepputilbúgving verja og gagna teimum lægstløntu og meðalløntu og harumframt veikastu bólkunum í samfelagnum. Økisliga skulu teir partar av landinum, ið standa fyri størstu bráðfeingis trupulleikunum, og sum mega leggja um, orsakað av komandi bygnaðarbroytingum, merkja mestu íløgur í framtíðina. Vinnupolitiskt skulu neyðugu umleggingarnar til burðardygga tilfeingisnýtslu og orkunýtslu kjølfestast. Mentanarpolitiskt skulu hækkingar gerast á fíggjarlógini viðvíkjandi skapandi list, bókmentum, tónleiki, sjónleiki, ítrótt, týðing og orðabókagerð. Umleggingar til øðrvísi orkuframleiðslu og nýtslu skulu fremjast og dygg umhvørviskrøv setast. Altjóða samstarvið skal framvegis styrkjast. Og íløgur í hægri útbúgving og gransking skulu halda fram, hóast búskaparligu flóðalduna, sum nú rakar heimin, tí eyðvitað eru hesar íløgur tær skilabestu, sum gerast kunnu yvirhøvur, skal støðið í vælferðarsamfelagnum haldast og mennast frameftir.

Harafturat mælir Tjóðveldi til, at samráðingar beinanvegin verða tiknar upp millum allar flokkar, um eina tilbúgving, í sambandi við útflutningskreditt hjá útflutningsvinnunum og í samband við eina støðuga tilbúgving mótvegis fíggjarmarknaðunum.

Samanumtikið tykist tað sum um, at ein samd Fíggjarnevnd ikki á sama hátt sum landsstýrið er sinnað til, at lata fíggjarstýringina í landinum upp í hendurnar á fullkomnu tilvildini. Ymiskar ástøður eru um, hvussu eitt samfelag verður stjórnað úr eini kreppulíknandi støðu, og í Bretlandi síggja vit m.a., at Gordon Brown er vendur aftur til ta klassisku keynesianismuna, har almenni geirin rúmkar sítt virksemi í einum tíðarskeiði, táið privati geirin tíðaravmarkað hoykir undan. Skal hesin politikkur veruliga muna, er tað rættiliga avgerandi, at almenni geirin er meira girðin og hartil meira skilagóður enn tað, sum vit hava sæð í Føroyum hesi seinastu árini, har almenni og privati geirin hava kappast í ekspansiva politikkinum. Harvið verður fallið samsvarandi stórt, táið tann tíðin kemur. Resonansur kemur í fleiri máttir samstundis, sum styrkja hvønnannan, bæði á veg uppeftir og niðureftir. Vit hava havt varðhugan

av, at Fíggjarnevndin hóast alt er sinnað til at royna hesa leiðina. Tí varð konsensus um eina strategi í trimum fasum. Í felag at repa mest møguligt í vanliga almenna rakstrinum, í felag at lynna undir so nógv virksemi sum gjørligt kring landið, ígjøgnum eina so stóra íløgukvotu sum møguligt, og í triðja lagi, at ymisku partarnir í nevndini løgdu fram eina politiska raðfesting samsvarandi hugsjónum flokkanna.

Langtíðarpolitikkurin í fíggjar- og búskaparmálum skal vera, at javnvág er yvir tíð á Løgtingsins fíggjarlóg, eisini í mun til eina niðurlaðaða ríkisveiting. Tí ræður um at trimma rakstrarútreiðslurnar mest møguligt. Bygnaðarbroytingar mega gerast, og høvið tykist oftani verða, táið stígur er í, annars er tað eftir øllum at døma ikki politiskt opportunt at broyta skeivar samfelagsstrukturar, sum broyttir kunnu styrkja um inntøkusíðuna aftur. Hugsa t.d. um ein nýggjan fiskivinnupolitikk, sum kundi ment samfelagsbúskapin munandi næstu árini, tí har er størsta og skjótasta potentialið at fara eftir.

Viðvíkjandi teknisku trimmingini á rakstarsíðuni og viðvíkjandi íløgupartinum av fíggjarløgtingslógini 2009 er semja, harvið er ongin orsøk til, at minnilutin ger greiði fyri tí partinum, annað enn, at vit eru partur av felagsálitinum.

Umframt hetta hava vit gjørt nakrar politiskar raðfestingar, sum kunnu bøta munandi um raksturin av føroyska samfelagnum. Hetta krevur bygnaðarbroytingar og broyttan politiskan hugburð, men Løgtingið sleppur ikki undan í framtíðini at taka støðu til hesi mál, tí fara vit at heita á landsstýrið, um skjótast gjørligt at fara undir arbeiðið at broyta lóggávuverkið samsvarandi niðanfyrinevndu uppskotum til fíggjarløgtingslógina 2009:

**<u>Inntøkur:</u>**

| | |
|---|---|
| **40,00 mió. kr.** | Tilfeingisgjald, sum lagt verður á ogn Føroya fólks. Hetta gjaldið skal vera galdandi fram til tann dagin, ætlaða Tilfeingisbúðin fer til verka, har alt tilfeingi Føroya støðugt skal vera í almennum útboði. Sjálvandi skal tilfeingisgjaldið setast eftir virðunum av ymsu fiskasløgunum, men ein meðaltakstur á 10-15 oyru pr. kg, svarar til nevndu upphæddina. |
| **25,00 mió kr.** | Grønur skattur ella $CO_2$-gjald. Svarar til, at hálv króna verður løgd á hvønn litur, sum seldur verður á bensinstøðunum. Samstundis, sum hetta verður gjørt, eigur landsstýrið at skipa fyri tiltøkum, sum minka um útlátið av vakstrarhúsgassum, og harvið gera okkum minni heft at oljuni. Hetta eigur at gerast við tiltøkum, sum hava til endamáls at finna fram til og menna varandi orkukeldur.<br>Tað er nógv, sum bendir á, at vit hava hópin av ótroyttum orkukeldum í náttúru okkara, sum umhvørvisliga og fíggjarliga er óforsvarligt ikki at gagnnýta. Her verður t.d. hugsað um vind-, sjógv-, aldu- og sólorku. |
| **5,00 mió. kr.** | Skattainntøka orsakað av tí, at ALS-útgjaldið verður hækkað úr 70% upp í 80% |
| **11,00 mió. kr.** | Rentustuðulsskipanin verður broytt soleiðis, at hon í fyrsta lagi verður fasthildin fyri gjørdar handlar, tó við einum innsettum avdráttarprofili á 15 ár. Øll nýggj húsalán koma undir eina niðurlaðing á 4% p.a., soleiðis at |

skipanin er burtur um 10-15 ár. Skipanin hevur verið atvoldin til ein avlagaðan húsaprís og í størstan mun er hetta vorðið ein spurningur um at flyta landskassagjaldføri beinleiðis yvir í gjaldføri hjá fíggjarstovnunum, sum fíggja sethúsamarknaðin.

**5,00 mió. kr.** Arvaavgjaldið er væl lægri í Føroyum enn í londunum kring okkum, tí kann ein regulering í takstinum geva landskassanum hesa inntøkuna.

**40,00 mió. kr.** Hækking í inntøkuskattinum hjá hægru inntøkunum. Skattapolitikkurin hesi seinastu árini hevur bara verið til fyrimunar fyri tey vælbjargaðu við høga lønarlagnum. Inntøkur landskassans eru tódnaðar við áleið 400 mió. kr. um árið av hesi orsøk. Nú tað hakar í búskaparliga, eiga hesar somu breiðu herðar at taka á seg sín part av byrðuni. Fíggjarmálaráðið eigur at broyta skattalógini samsvarandi hesi áseting.

**60,00 mió. kr.** Sjómansfrátturin verður tikin av í skattaskipanini. Ein skattaskipan eigur at vera generel fyri allar borgarar í einum landi.

**28,00 mió. kr.** Inntøkutrygdin hjá fiskimonnum verður flutt arbeiðsmarknaðinum, har hon heilt natúrliga hoyrir heima. Arbeiðsmarknaðurin eigur stóra trygdargrunnin ALS, sum sjálvsagt eigur at broyta sínar viðtøkur soleiðis, at inntøkutrygdin fær innivist í heusm geiranum. Sjó- og fiskimenn eru tvingsilsinnlagdir at gjalda í grunnin, men trupult er hjá hesum fakbólkum at fáa nakað úr grunninum aftur. Tískil verður hetta uppskotið sett fram.

**0,50 mió. kr.** Filmseftirlitið verður tikið av.

**2,50 mió. kr.** Brúkaragjøldini á Trygdarmiðstøðini verða ásett soleiðis, at støðin gerst útreiðsluneutral á fíggjarlógini.

**0,00 mió kr.** Sitandi samgonga tykist onga ætlan hava um at fara undir Sandoyartunnilin yvirhøvur. At seta 2 mió. kr. á fíggjarlógina hevur eittans sum endamál at kyrra ein samgongutinglim. Úr oynni. Hesar 2 mió. kr. høvdu verið betri farnar í verkætlanina, at gera eina ítróttarhøll í Sandoy. Kommunurnar í oynni seta seg neyvan førar fyri at fara undir hesa ætlan í bræði, tí eigur landsstýrið at gera eina serliga lóg fyri hesa bygging. Komast kann aftur til tunnilin, táið tað veruliga er ætlanin at fara undir at gera hann.

**15,00 mió. kr.** Tøka av yvirskotsfæi í Búnaðargrunninum, sum er landsins ogn og sum er yvirkapitaliseraður í óneyðuga stóran mun.

**0,10 mió. kr.** Pro Vita verður strikað av útreiðslusíðu fíggjarlógarinnar.

**1,50 mió. kr.** Minking av rakstrinum hjá løgmansfyrisitingini.

**1,40 mió. kr.** Minking av rakstrinum hjá úttanríkisráðnum, har m.a. ein óneyðug kanning av ES eigur at verða tikin burtur.

| | |
|---|---|
| **7,00 mió. kr.** | Endurgjaldsgrunnur alivinnunar verður inntøkuførdur og nýttur sum stovnsfæ í einum nýggjum granskingargrunni, sum bert hevur til endamáls at granska í fiskaaling, eitt nú í toskaaling. |

**242,00 mió. kr.**
============

**<u>Útreiðslur:</u>**

| | |
|---|---|
| **77,00 mió. kr.** | Niðurlaðing av ríkisveitingini í 2009, samsvarandi eini ætlan um, at hon er heilt burtur í 2015. Væl vitandi, at semja er gjørd við donsku ríkisstjórnina um veitingina í 2009, er hetta sett inn sum eitt politiskt tal, sum fyrst og fremst skal gera greiði fyri, hvussu fíggjarlógin hevði verið skipað, um Tjóðveldi saman við ørðum sat við valdi landsins. |
| **3,00 mió. kr.** | Menningarætlan fyri Fróðskaparsetur Føroya, við serligum atliti at eini nýggjari journalistútbúgving. |
| **1,00 mió. kr.** | Búskaparráðið eigur at fáa eina játtan soleiðis, at tað fær virkað til fulnar sum ráðgevi hjá politiska myndugleikanum - í fíggjar- og búskaparmálum. |
| **1,00 mió. kr.** | Fiskivinnuroyndir. |
| **1,00 mió. kr.** | TACIT (veðurlagsgransking) |
| **1,00 mió. kr.** | Aliroyndir. |
| **5,00 mió. kr.** | Granskingargrunnurin. Endamálið við hesi øktu játtan til gransking er at gera okkum betur før fyri at standa okkum væl mótvegis teimum avbjóðingum og støðugu broytingum, sum heimur okkara hevur flutt seg og flytir seg í. Gransking er neyðug fyri at fáa til vega ta vitan, sum vinnulív og samfelagstænastur hava tørv á fyri at menna seg, og er somuleiðis neyðug fyri at vit kunnu vera við í kappingini við aðrar vinnur úti í heimi og fyri at vera við í kappingini við tænastur í øðrum samfeløgum. |
| **3,00 mió. kr.** | Mentanargrunnurin. |
| **1,00 mió. kr.** | Tjóðpallur Føroya |
| **2,00 mió. kr.** | Musikkskúlaskipanin |
| **1,00 mió. kr.** | ÍSF – markað til landsliðsítrótt harímillum hondbólt o.s.fr. |
| **4,00 mió. kr.** | Umsorganararbeiði – dagtilhaldini. |

| | |
|---|---|
| **2,00 mió. kr.** | Tiltøk til fólk við menningartarni. |
| **1,00 mió. kr.** | Psykiatri og ungdómstelefon. |
| **1,40 mió. kr.** | Koppseting móti lívmóðirhálskrabba. |
| **0,60 mió. kr.** | Stuðul til heilivág til pensjónistar. Júst samtykta lógarbroytingin má harvið broytast aftur. |
| **6,00 mió. kr.** | Javningin í pensjónunum verður broytt aftur úr 3% upp í 4% |
| **2,00 mió. kr.** | Hægri stuðul til lesandi uppihaldarar. |
| **1,00 mió. kr.** | Skuldaráðgeving til fólk í trongstøðu – ráðgevar keypast at veita ókeypis ráð. |
| **1,00 mió. kr.** | Sendistova í Moskva. |
| **2,00 mió. kr.** | Skeið og eftirútbúgving av ófaklærdum fólki. Sjálvsagt, at teknisku skúlarnir í landinum og kanska miðnáms- og handilsskúlarnir somuleiðis fara undir at skipa fyri hesum |
| **2,00 mió. kr.** | Prosjektering av lista- og ítróttaháskúla í Sandoy. |
| **2,00 mió. kr.** | Prosjektering av einum 50 metra longum kappingarhyli í Vági. |
| **1,00 mió. kr.** | SSP. Hetta er fyribyrgjandi arbeiði, sum hevur til endamáls at fyribyrgja, at børn og ung ikki gerast lógbrótarar, og at tey, sum eru komin í kriminalitet, kunnu hjálpast burturúr hesi støðu aftur skjótast gjørligt. |
| **2,00 mió. kr.** | Dagpeningaskipanin. Ætlanin við hesi upphædd er, at foreldur skulu lønarkompenserast fyri at vera heima fyrsta sjúkradag barnsins. |
| **2,00 mió. kr.** | Hagstova Føroya til verkætlanina viðvíkjandi fólkateljing. |
| **10,00 mió. kr.** | Byrjandi íløga í nýtt havrannsóknarskip, sum er um at vera liðugt prosjekterað. |
| **136,00 mió. kr.** | |
| =========== | |

Samsvarandi hesum viðmerkingum setur minnilutin fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 3. Fíggjarmál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -8.000 | -8.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarj.) | U: | 782 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarj.) | U: | 10.076 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin j.) | U: | 160.000 | 52.000 |
| | **BU:** | **-11.000** | **-** |

# § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -35.499 | -28.499 | 7.000 |
| Løgu ætlan | -5.000 | 10.000 | 15.000 |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 31.1.07. Veðurtænastan (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 33.2.11. Almenn jørð, søla (Løguj.) | U: | 25.000 | 25.000 |
| | **BU:** | **-** | **15.000** |
| 34.1.27. Endurgjaldsgrunnur alivinnunar | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **7.000** |
| 34.3.06. Nýtt havrannsóknarskip (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **10.000** | **-** |
| 34.3.07. Fiskivinnuroyndir (Rakstrarj.) | U: | 5.054 | - |
| | **BU:** | **1** | **-** |
| 34.3.27. Aliroyndir | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 34.4.01. Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin j.) | U: | 28.000 | - |
| | **BU:** | **-28.000** | **-** |
| 35.1.03. Trygdarmiðstøðin (Rakstrarj.) | U: | 2.640 | - |
| | **BU:** | **-2.500** | **-** |

# § 6. Vinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løgu ætlan | 2.000 | 2.000 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 24.6.13. Ítróttarhøll í Sandoynni (Løguj.) | U: | - | - |
| *verður flutt til § 7* | **BU:** | **2.000** | **-** |

# § 7.  Mentamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 20.638 | 20.638 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (Rakstrarj.) | U: | 559 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 23.5.10. Musikkskúlar (Rakstrarj.) | U: | 10.888 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | U: | 31.342 | - |
| | **BU:** | **3.000** | **-** |
| 23.6.21. Granskingargrunnurin | U: | 6.930 | - |
| | **BU:** | **5.000** | **-** |
| 23.7.04. Lestrarstudningur (Lógarbundin j.) | U: | 103.391 | 10.500 |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 24.1.22. Filmseftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 362 | - |
| | **BU:** | **-362** | **-** |
| 24.2.04. Mentanargrunnurin | U: | 5.700 | - |
| | **BU:** | **3.000** | **-** |
| 24.2.06. Leiklist (Rakstrarj.) | U: | 5.058 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 24.6.06. Ítróttarsamband Føroya | U: | 6.550 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 24.6.12. Ítróttaranlegg | U: | 3.000 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |

# § 8.  Almanna- og heilsumál o.a.

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 17.900 | 17.900 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 20.1.04. Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarj.) | U: | 3.123 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 20.1.10. Koppsetingar (Lógarbundin j.) | U: | 4.825 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **1.400** | **-** |
| 21.1.04. Almannastovan (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 21.1.22. Stuðul til feløg | U: | 1.550 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-100** | **-** |
| 21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | U: | 63.725 | 4.671 |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum | U: | 9.442 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin j.) | U: | 167.359 | 4.588 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **600** | **-** |
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | U: | 401.899 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **6.000** | **-** |
| 21.8.08. Umsorgararbeiði | U: | 6.806 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **4.000** | **-** |

# § 11. Heilsumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 20.1.27. Psykiatri og ungdómstelefon | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |

# § 16. Uttanríkismál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -400 | -400 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 11.1.54. Uttanríkistænastan (Rakstrarj.) | U: | 25.061 | - |
| | **BU:** | **-400** | **-** |

# § 20. Inntøkur

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -93.005 | 77.000 | 170.005 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 52.1.01. Vanligur landsskattur | U: | - | 1.478.000 |
| | **BU:** | **-** | **105.000** |
| 52.1.25. Arvagjøld | U: | - | 5.500 |
| | **BU:** | **-** | **5** |
| 52.2.13. Brennioljugjald | U: | 13.000 | 79.000 |
| | **BU:** | **-** | **25.000** |
| 52.2.48. Tilfengisgjald | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **40.000** |
| 54.1.01. Heildarveiting o.t. | U: | - | 635.000 |
| | **BU:** | **77.000** | **-** |

**Ein annar minniluti** (Bill Justinussen) hevur harumframt hesar viðmerkingar:

Búskaparstøða landsins verður av fleiri samanborin við búskaparstøðuna fyrst í nítiárunum. Tó eru fleiri munir, sum kunnu hava avgerandi ávirkan á, hvussu vit sum fólk og tjóð standa royndina. Í mun til fyrst í nítiárunum hevur landskassin nú gott gjaldføri. Sosialir grunnar tryggja lønir og veitingar einstaklinga, hóast arbeiðsloysi er. Hóast niðurgongd nú er í fiskivinnuni, hava aðrar vinnur tikið dik á seg, serliga alivinnan, sum nú stendur fyri helminginum av føroyska útflutningsvirðinum. Eisini arbeiða alsamt fleiri føroyingar í frálandavinnuni og sum útisiglarar. Føroyska arbeiðsmegin er nú eins og tá sera flytbær, og er hetta tjóðini til fyrimunar í tíðum sum hesum. Útbúgvingarliga eru føroyingar væl fyri, og er tað ein varandi kelda til framburð.

Mangt bendir á, at 2009 verður eitt ár við stórum avbjóðingum fyri føroyingar. Fíggjarheimurin sleikir sárini av egnum dugnaloysi og vantandi varni fyri teirri peningagirnd, sum hevur eyðkent fíggjarheimin í hesi øldini. Sum altíð vænta øll, at rokningin endar hjá skattgjaldaranum. Tí er uppgávan at royna at tryggja, at ikki øll rokningin verður send ósekum. Søgan endurtekur seg í ólukkumát, og framvegis tykjast tey, sum staðið hava á odda fyri ovurnýtsluveitsluni, ikki at kenna ábyrgdina fyri upptakinum. Higartil hava almennu kassarnir í londunum kring okkum og her heima enn eina ferð verið noyddir at gjalda gildið.

Í tíðum sum hesum er neyðugt at stýra skynsamiliga. Landsins fíggjarlóg er eitt av fleiri týðandi amboðum í búskaparstýringini. Avbjóðingin er yvir nøkur ár at finna røttu javnvágina millum inntøkur og útreiðslur landskassans. Strukturella hallið tykist liggja um ½ milliard krónur. Tí verður helst neyðugt bæði at minka um útreiðslurnar og hækka inntøkurnar. Høvuðsuppgávan er at halda uppi einum samhaldsføstum felagsskapi, har øll kenna ábyrgd, bæði tann, sum letur og tann, sum fær. Verður skattgjaldarans peningur umsitin virðiliga, verður skattur goldin virðiliga. Verður søplað við skattaborgarans peningi, verður hugurin at gjalda skatt minni.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini hevur minnilutin m.a. mett um hesi viðurskifti:

- Langtíðarhaldbæri
- Týdningurin av útreiðsluni/løguni fyri borgaran
- Inntøkugrundarlag landskassans
- Vinna og vinnubygnaður
- Ráðgeving frá almennum stovnum, fakfeløgum, fíggingarstovnum, vinnulívi og øðrum álitispersónum
- Týdningurin av teirri stabiliserandi ávirkan, sum fíggjarlógin kann hava fyri landsbúskapin
- Styrkin í almenna og privata búskapinum, herundir gjaldføri og skuldbinding
- Landafrøðislig atlit

<u>Langtíðarhaldbæri</u>
Mangt bendir á, at í vanligum tíðum við hvørki há- ella lágkonjunkturi, er hallið á fíggjarlógini fleiri hundrað milliónir krónur. Tøki peningur landskassans er 1,7 mia. kr., og tað merkir, at eftir fáum árum eru pengarnir uppi og landið má út á lánsmarknaðin eftir peningi at fíggja landshúsarhaldið. Hetta er ikki ein haldfør støða, og tí eigur hallið á landsins fíggjarlóg at vera burturi eftir fáum árum. Til tess at náa hesum máli, mugu inntøkur landskassans vaksa og útreiðslurnar minka. Hetta er avbjóðingin og orsøkin til, at skorið verður í almennum útreiðslum samstundis, sum neyðugt verður at hækka skattir, avgjøld og brúkaragjøld.

Týdningurin av útreiðsluni/løguni fyri borgaran
Útreiðslurnar á fíggjarlógini fevna um øll viðurskifti í samfelagnum. Har eru bæði játtanir at koma teimum veikastu í samfelagnum til hjálpar, samstundis sum játtanir eru til lítið átrokandi mál. Miðflokkurin hevur greiða raðfesting. Játtanir til almanna- og heilsuverkið mugu ongantíð líða undir, at peningur verður settur av til lítið áleikandi mál. Hava vit ikki ráð til alt, mugu vit skera, har tað ikki rakar pensjónistar, sjúk, fólk við serligum tørvi, barnafamiljurnar v.m. Vit hava ikki ráð at granska, ferðast, skipa fyri minni týðandi ráðstevnum osfr., um vit ikki hava ráð at veita teimum mest treingjandi allan neyðugan stuðul.

Inntøkugrundarlag landskassans
Frá Fíggjarmálaráðnum hevur Fíggjarnevndin fingið stutta frágreiðing um inntøkumetingina fyri novembur 2008. Henda frágreiðingin lýsir væl tað, sum er hent í búskapinum seinastu mánaðirnar, og verður henda frágreiðingin løgd við sum skjal í málinum.

## Stutt frágreiðing
## um
## inntøkumetingina desember 2008

Fíggjarmálaráðið hevur fleiri ferðir víst á, at stóri vøksturin í inntøkum landskassans í 2007 og 2008 stavar frá stórum bráðvøkstri í avgjaldsinntøkunum, serliga meirvirðisgjaldsinntøkunum, ið eru nógv tær størstu avgjaldsinntøkurnar og størsta inntøka landskassan yvirhøvur, eftir skattainntøkurnar. Høvuðsorsøkin til stóra bráðvøksturin í avgjaldsinntøkunum vóru nýggju fíggingartilboðini og kappingin millum føroysku peningastovnarnar, sum byrjaði í 2005 og rættiliga kom í hæddina í 2006 og 2007. Meirvirðisgjaldsinntøkurnar vuksu 309 mió. kr. ella góð 31% frá 2005 til 2007.

Álvarsliga fíggjarkreppan seinastu mánaðirnar hevur havt við sær, at føroyskir fíggingarstovnar hava táttað í harðliga á fíggjar- og kredittøkinum seinastu vikurnar. Eftirspurningurin, serliga eftir stórum og drúgvum nýtsluvørum, t.d. bilum, er tí minkaður líka brádliga. Hetta sæst aftur alt fyri eitt í stórum minkingum í avgjaldsinntøkum landskassans. Avgjaldsinntøkurnar, serliga meirvirðisgjald og skrásetingargjald, verða tí munandi minni í ár og 2009, enn mett hevur verið fyrr í ár.

Størstu inntøkur landskassans eru vanligur skattur, meirvirðisgjald og heildarveitingin úr Danmark. Hesar inntøkurnar stóðu í 2007 fyri umleið 80% av inntøkum landskassans. Stór minking er í avgjaldsinntøkunum, nú bráðvøksturin í nýtsluni steðgar líka brádliga, sum hann byrjaði fyri skjótt tveimum árum síðan. Stóra virksemið sama tíðarskeið, serliga innan byggivinnuna, hevur havt eina lønarglíðing við sær, og lønarlagið hevur tí verið væl hægri enn, tað annars hevði verið. Nú fíggingarstovnarnir tátta í, glíður lønarlagið aftur upp á pláss og skattainntøkurnar verða tí minni. Skattainntøkurnar verða tí mettar til 1.370 mió. kr. í ár og 1.405 mió. kr í 2009. Hetta er ávikavist 40 og 73 mió. kr. minni, enn mett varð fyrr í ár. Hækkingin í skattainntøkunum í 2009 er grundað á sáttmálahækkingar, strikan av skattalættanum og regulering av FAS-endurgjaldinum.

Skattainntøkurnar lækka harafturímóti av, at virksemið minkar og lønarlagið í samfelagnum nú glíður niður ímóti sáttmálalønunum. Av tí, at arbeiðsloysið er sera lítið og virksemið framvegis er rímiliga stórt, verður mett, at arbeiðsloysið fer ikki at hava so stóra ávirkan á skattainntøkur landskassans í 2009.

Meirvirðisgjaldsinntøkurnar verða nú mettar til 1.300 mió. kr. í 2008 og 1.200 mió. kr. í 2009, sí viðløgdu inntøkumeting. Hetta eru ávikavist 75 og 125 mió. kr. minni, enn mett hevur verið fyrr í ár. Skrásetingargjaldsinntøkurnar verða mettar til 100 mió. kr. í ár og 60 mió. kr. í 2009, hetta eru ávikavist 20 og 30 mió. kr. minni, enn mett hevur verið fyrr í ár.

Heildarveitingin saman við endurgjaldinum til tænastumenn verður 635 mió. kr. í ár, og tað verður hon eisini í 2009.

Av øðrum broytingum kann nevnast, at eingin útluting kemur úr Fíggingargrunninum í 2009 og 2010. Hetta er samsvarandi trygdaravtaluni, sum danska stjórnin og Løgtingið samtyktu í september um at tryggja gjaldførið hjá øllum fíggingarstonum í danska ríkinum. Sambært hesi avtaluni skulu fíggingarstovnar, ið eru fevndir av avtaluni, ikki rinda vinningsbýti í 2009 og 2010. Inntøka landskassans av felagsskattinum í 2008 verður væl hægri, enn mett hevur verið frammanundan.

Vinna og vinnubygnaður

Høvuðsvinnan hevur ligið tungt í sjónum alt árið 2008. Tað tykist ikki at vera vilji í politisku skipanini at fremja neyðugar broytingar, so veiðitrýstið verður lagað til eftir tí, sum fiskastovnarnir megna at bera. Hóast væl grundaða ráðgeving í mong ár, hevur politiski myndugleikin latið veiðimannin røkt okkara fiskastovnar. Úrslitið er, at vit nøkur ár hava góða veiðu, meðan vit onnur ár eru fyri ongum. Vit kunnu ikki stýra náttúruni, men vit kunnu í minsta lagi stýra eftir náttúruni. Í einum landi, sum í so stóran mun livir av fiskivinnuni, er tað skilaleyst ikki at stýra so, at javnasta tilgongdin fæst. Sveiggini í búskapinum raka alt ov hart, og tí eiga stig at verða tikin, so bæði fiskastovnar og fiskatilfeingi verða umsitin á burðardyggan og skynsaman hátt.

At vit framvegis stuðla høvuðsvinnuni við skattafyrimunum er ikki ein ynskilig støða. Men ásannandi, at vit eru í harðari kapping við grannalondini um sjófólkið, ber neyvan til at broyta hesa skipan í bræði. Hjá føroyingum er fiskivinnan høvuðsvinnan, meðan hon í grannalondunum er ein munandi minni partur av samlaða búskapinum. At Noreg letur stórar skattafyrimunir til sjómenn, er ein risaavbjóðing fyri okkum, júst tí at fiskivinnan er høvuðsvinna. Um høvuðsvinnan, sum stuðlar upp undir alt annað í samfelagnum, sjálv skal hava stuðul, hongur ikki saman.

Føroyingar lata russum svartkjaft fyri toskakvotuna í Barentshavinum. Fólk eru ymisk á máli um hesa skipan. Nøkur meta, at meir kundi fingist fyri svartkjaftin, um hann varð virðisøktur í Føroyum. Vit hava í Føroyum framkomið virki, sum framleiðir svartkjaftin til alifóður. Aldi laksurin verður í vaksandi mun góðskaður í Føroyum. Samlaða virðisøkingin er fleirfaldað, um øll lið telja við. Hesi 100.000 tonsini, virðisøkt til aldan og góðskaðan laks mett í mun til kvotuna í Barentshavinum, er tað, sum skilir partarnar. Hinvegin hevur fiskiskapurin í Barentshavinum havt ómetaligan týdning fyri føroyska samfelagið í mong tíggju ár; eisini hevur hesin fiskiskapurin verður sera støðugur í mun til fiskiskapin á heimaleiðunum. Til samráðingarnar komandi ár er neyðugt, at ein avgerð verður tikin um framtíðarmøguleikarnar øllum hesum viðvíkjandi.

Alivinnan hevur nú ment seg til skjótt at gerast nýggja høvuðsvinna føroyinga. Tamarhald er fingið á hóttandi fiskasjúkum, og skilagóð stýring er á umhvørvisliga partinum. Væntast kann, at framleiðsla úr alifiski verður tann nýggja “flakavinnan” í Føroyum, nú siðbundna flakaframleiðslan tykist vera fyri hóttafalli. Samstundis, sum fleiri skip hava flakavirki umborð, tykist ein líðandi yvirgongd at fara fram. Men enn er siðbundna flakavinnan ein megindrívmegi í Føroyum. Hópin av familjum kring landið fáa til lívsins uppihald á hesum arbeiðsplássum, og tí eigur politiski myndugleikin ikki at sita hendur í

favn, meðan eitt virki fyri og annað eftir snarar lykilin um. Uttan iva verður neyðugt við politiskum átøkum, tá komið er inn í 2009, fyri at ikki øll fiskaframleiðsla skal fara fyri bakka og vit aftur enda sum rávøruútflytarar.

Ráðgeving frá almennum stovnum, fakfeløgum, fíggingarstovnum, vinnulívi og øðrum álitispersónum
Tað tykist, sum allir ráðgevarar eru samdir um, at landið ikki eigur at halda aftur hóast stórt undirskot á fíggjarlógini. Tað er í tíðum við lágkonjunkturi, at ekspansivur fíggjarpolitikkur eigur at rekast. Men fortreytirnar eru ikki tær bestu. Illa ber til at veita fleiri skattalættar nú, tí tey kortini eru væl og virðiliga farin um allar geilar. Høvdu skattalættar ikki verið latnir í árunum 2006-2008, hevði undirskotið á fíggjarlógini ikki verið so stórt sum nú, og so høvdu ráðini verið betri til skattalættar nú. Hinvegin er framvegis tørvur á at útbyggja samfelagið, og tí partinum av ekspansiva fíggjarpolitikkinum kunnu vit halda fram við. Tí verða løgur framdar, hóast stórt undirskot á fíggjarlógini. Somuleiðis verður hildið rætt ikki at fremja stórar sparingar í rakstrinum, tí hetta kann bara økja um niðurgongdina.

Styrkin í almenna og privata búskapinum
Meðan almennu Føroyar hava lutfalsliga gott gjaldføri og lítla skuld, er skuldin hjá privatum økt munandi seinastu tíðina. Nýggj lánitilboð, har onki var óført og rentan metlág, hava lokkað vinnulív og privatfólk at lána yvir evni. Nú skal rokningin gjaldast, og tí er botnurin farin undan gjaldførinum í pørtum av vinnuni og samstundis hjá mongum privatum. Bara í fiskiflotanum er skuldin økt við hundraðtals milliónum eftir stuttari tíð. Skeivur vinnubygnaður, har fiskiloyvini, sum eru almenn ogn, verða seld, er ein høvuðsorsøk. Fiskiflotin er í dag so skuldartyngdur, at fleiri húsagangir kunnu væntast. Tó er áræðið so mikið stórt í føroyinginum, at vónir eru um, at flestu skip vera verandi í landinum. Við viknandi búskapi í privata sektorinum er týdningarmikið, at tað almenna nýtir møguleikan at stabilisera gongdina, so niðurgongdin verður avmarkað og harvið avleiðingarnar.

Landafrøðislig atlit
Gongdin higartil hevur víst, at tað eru økini longst frá høvuðsstaðnum, sum verða harðast rakt av búskaparligu afturgongdini. Bæði í Norðoyggjum, Vágum,  Sandoy og Suðuroy hava fólk mist arbeiðið. Tí er skilagott frá almennari síðu at nýta íløgukrónurnar á fíggjarlógini har, sum tær gera mest nyttu sum arbeiðsskapandi tiltøk. Tá tað samstundis er á hesum økjum, at tørvurin á ætlaðu útbyggingunum er størstur, talar alt fyri, at íløgurnar fyri fíggjarárið 2009 verða gjørdar uttanfyri høvuðsstaðin. Átøkini mugu hava til endamáls, at ein fólkaflyting inn móti miðjuni í Føroyum ikki tekur dik á seg orsakað av versnandi tíðum.

Minnilutin hevur tikið hesi atlit í sínum broytingaruppskotum. Umframt broytingaruppskotini frá eini samdari nevnd, hevur andstøðan í Fíggjarnevndini síni broytingaruppskot. Harumframt hevur umboð Miðfloksins í Fíggjarnevndini hesi broytingaruppskot við viðmerkingum:

05-34.4.01 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum **-22.000**
Mett verður, at henda skipan eigur at vera í ALS. Sjómenn rinda inn í ALS á jøvnum føti við øll onnur; tí er skipanin vælegnað at vera umsitin haðani. Roknast kann við, at lógin verður broytt innan 1. apríl. Tí verður skotið upp at játta pening til verandi skipan tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í 2009.

06-11.1.48 Kvinnuluttøka í politikki **-200**

Játtanin var í 2006 kr. 103.000. Síðani er hon økt til kr. 400.000 í 2008, av tí at val skuldi verða bæði til løgtingsval og kommunuval. Nú hesi val eru farin afturum, er hóskandi at minka játtanina.

07.23.6.20 Granskingarráð Føroya **-2.480**

Henda játtan fer ikki til at stuðla gransking, men bert til umsiting. Nú er Føroya Vísindaráð við løgmanni á odda skipað og ein nýggj granskingarnevnd kemur í staðin fyri granskingarráðið. Fyrireikingar verða gjørdar til at samansjóða verandi granskingarfyrisitingar o.a. Av tí at løgmaður og hini, sum sita í Vísindaráðnum, fáa almenna løn fyri sítt starv, gevur tað lítla meining at játta henda pening. Lítlar ábendingar eru um, at hesin peningur fer at skapa annað enn óteljandi fundir um onki og enn fleiri frágreiðingar um onki. Tað verður mett ábyrgdarleyst at nýta pening til slík endamál í tíðum, har fólk í hópatali ganga arbeiðsleys kring landið.

07-24.3.02 Bókasøvn **+1.217**

Landsstýriskvinnan hevur boðað frá, at tilsøgn er givin til Sands kommunu um hesa upphædd. Minnilutin tekur undir við hesi tilsøgn. Byggiarbeiði uttanfyri høvuðsstaðin fyri almennan pening er góður ekspansivur fíggjarpolitikkur í hesum døgum. Samstundis er ætlanin bæði spennandi og sunn, tí hin parturin av fíggingini kemur frá privatum íleggjara. Sjálvandi skulu fólk á smærri oyggjunum hava somu møguleikar til at nema sær vitan, undirhald og mentanarligan førning, sum fólk inni á meginlandinum.

11-20.1.10 Koppsetingar **+2.400**

Minnilutin heldur tað vera rætt at seta pening av til koppseting móti lívmóðurhálskrabba hjá gentum, sum í árinum eru fyltar 12 ár. Fyrsta árið eiga heilsumyndugleikarnir harumframt at taka stig til at koppseta gentur í aldrinum 13, 14 og 15 ár, so hesar eisini fáa gagn av fyribyrgingarátakinum.

11-20.2.05 Útbúgving av yngri læknum **-2.100**

Í fleiri ár hava nógvir kommunulæknar verið á veg í Føroyum. Vónirnar um, at skjótt fór áralangi áleikandi tørvurin á kommunulæknum at vera burtur, tykjast fúna sum árini fara. Hetta hóast peningur á hvørjum ári er settur av til endamálið. Minnilutin ivast í, um batar verða framdir við at økja játtanina.

12-21.7.01 Vanlig forsorg

Minnilutin skjýtur upp at broyta løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 112 frá 11. desembur 2007: §12b verður broytt, so hon samsvarar við galdandi tørv og praksis á økinum.

12-21.4.01 Dagpeningaskipanin **+1.800**

Víst verður til viðmerkingarnar til uppskot nr. 59/2008 hjá Miðflokkinum um barnsins 1. sjúkradag.

12-21.8.01 Fólkapensjón

Minnilutin skjýtur upp at broyta løgtingslóg nr. 107 frá 22. desembur 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, soleiðis at árliga javningin frá 2008 til 2009 hækkar úr 3% í 4%.

12-21.8.05 Fyritíðarpensjón

Minnilutin skjýtur upp at broyta løgtingslóg nr. 107 frá 22. desembur 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, við seinni broytingum, soleiðis at árliga javningin frá 2008 til 2009 hækkar úr 3% í 4%.

12-21.8.08 Umsorgararbeiði

Minnilutin skjýtur upp at broyta løgtingslóg nr. 46 frá 9. mai 2005 við seinni broytingum soleiðis, at stuðulin frá landinum eisini fevnir um mattænastu, koyritænastu og vitjanartænastu.

16-37.1.03 SamVit **-8.000**

Í SamVit eru 18,5 fulltíðarstørv, harav 4 í lønarflokki 36 ella hægri. Sum búskaparstøða landsins sær út, verður mett, at landið ikki hevur ráð til partar av virkseminum hjá SamVit. Minnilutin ivast í, hvussu nógv fæst fyri hesa játtan. Hóast tað áhaldandi í mong ár hevur verið víst á grundleggjandi trot á veitingar til ferðafólk, sum koma til Føroyar, tykist ikki, sum almenna íkastið til ferðavinnuna megnar at bøta um hesi viðurskifti. Á hvørjum sumri koma húsvognar í hópatali í land við Norrønu, men teirra uppliving av Føroyum sum ferðamannalandi er til stóran skaða fyri framtíðarferðavinnu í Føroyum. Vantandi nátthús, camping-økir og veitingar annars til hesa vinnu gera neyvan, at nakar vitjandi fær hug at koma aftur og enn minni mælir øðrum til at vitja landið. Sumt av tí, sum SamVit fæst við, tykist háfloygt, veruleikafjart og onkursvegna ikki lagað til føroysk viðurskifti.

20-52.2.07 Punktgjøld **-40.000**

Minnilutin heitir á løgmann um at seta úr gildi §1 og §2 í kunngerðini um, hvat ferðandi kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt til Føroya. Hetta hevði givið landskassanum eina meirinntøku á kr. 40 mió.

Samsvarandi hesum viðmerkingum setur minnilutin (Bill Justinussen) fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

## § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -22.000 | -22.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 34.4.01. Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (Lógarbundin j.) | U: | 28.000 | - |
| | **BU:** | **-22.000** | **-** |

## § 6. Vinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -8.200 | -8.200 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 11.1.48. Kvinnuluttøka í politikki (Rakstrarj.) | U: | 400 | - |
| | **BU:** | **-200** | **-** |
| 37.1.03. SamVit (Rakstrarj.) | U: | 14.935 | - |
| *verður flutt til § 16* | **BU:** | **-8.000** | **-** |

# § 7. Mentamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.480 | -2.480 | - |
| Løgu ætlan | 1.217 | 1.217 | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarj.) | U: | 2.480 | - |
| | **BU:** | **-2.480** | **-** |
| 24.3.02. Bókasøvn (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.217** | **-** |

# § 8. Almanna- og heilsumál o.a.

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 2.100 | 2.100 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 20.1.10. Koppsetingar (Lógarbundin j.) | U: | 4.825 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **2.400** | **-** |
| 20.2.05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarj.) | U: | 3.281 | - |
| *verður flutt til § 11* | **BU:** | **-2.100** | **-** |
| 21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | U: | 63.725 | 4.671 |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **1.800** | **-** |
| 21.7.01. Vanlig forsorg (Lógarbundin j.) | U: | 167.359 | 4.588 |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-** | **-** |
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | U: | 401.899 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-** | **-** |
| 21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | U: | 254.283 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-** | **-** |
| 21.8.08. Umsorgararbeiði | U: | 6.806 | - |
| *verður flutt til § 12* | **BU:** | **-** | **-** |

# § 20. Inntøkur

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -40.000 | -40.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| 52.2.07. Punktgjøld | U: | - | 205.000 |
| | **BU:** | **-40.000** | **-** |

**Fíggjarnevndin, 17. desember 2008**

Anfinn Kallsberg
formaður

Eyðgunn Samuelsen
næstformaður

Magni Laksáfoss

Bjørn Kalsø

Bill Justinussen

Tórbjørn Jacobsen

Annita á Fríðriksmørk